Nr. 9 • Apríl 2011

# MIÐ & MAGN




Føroya Skipara- og Navigatørfelag & Maskinmeistarafelagið

## ÚTGEVARI
Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag geva MIÐ & MAGN út í felag.
Blaðið verður sent limunum.
4 útgávur eru um árið.

## BLAÐNEVND
Páll Hansen (ábyrgd).
Regin Nónstein.
Eyðstein Djurhuus.
Jóan Petur Patursson.

## MASKINMEISTARAFELAGIÐ
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Telefon 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

## FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG
Jekaragøta 10
Postboks 248
110 Tórshavn
Telefon: 31 69 73
Teldupostur: fsn@fsn.fo

## BLAÐHALD
Tey, sum ynskja at halda MIÐ & MAGN kunnu boða frá hesum í teldupost til:
bladhald@midogmagn.fo
Haldara gjaldið er 200,- kr. um árið; t.v.s. 4 bløð.

## ENDURGEVING
Tað er loyvt at endurgeva tekst úr MIÐ & MAGN, tá keldan verður upplýst.
MIÐ & MAGN kann heintast í PDF á heimasíðunum hjá feløgunum:
www.mf.fo
www.fsn.fo

## FORSÍÐUMYND
Kennet Joensen og Petur Brodersen til arbeiðis í Shanghai.

## UMSITING
Sp/fMEDIA
info@midogmagn.fo

## UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ
Føroyaprent · www.foroyaprent.fo

UPPLAG: 1900


# Sáttmálasamráðingar



Nú hava Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelagið haft sínar regluligu ársaðalfundir.

Hyggja vit í ársfrágreiðingarnar, sum vóru lagdar fyri aðalfundirnar síggja vit, at 2010 var eitt hendingaríkt ár hjá báðum feløgunum. 2010 var merkt av nógvum virksemi. Og alt bendir á, at virksemið ikki verður minni í 2011.

Inniverandi ár byrjaði eitt sindur buldrasligt við samráðingum við Føroya Reiðarafelag.

Í hesum sambandi upplivdu vit bæði at vera til seming og, at Føroya Reiðarafelag kastaði samráðingarrættin frá sær. Men hetta er ikki fyrstu ferð, at tað er hent; tað sama hendi í februar 2005. Manningarfeløgini kendu ábyrgt, og góvu ikki skarvin yvir. Vit hildu á at samráðast, og tað lønti seg. Tað tók okkum einans 14 dagar at fáa sáttmálar við allar skipabólkarnar.

## MEN EFTIR STANDA NAKRIR SPURNINGAR.

Vit kunnu spyrja um tað er rætt, at Reiðarafelagið, sum umboðar okkara høvuðsvinnu, kastar samráðingarrættin frá sær og gevur skarvin yvir, tá teir sjálvir hava koyrt seg fastar?

Er tað ikki at loypa undan ábyrgd?

Sambært galdandi sáttmálum skulu vit aftur til samráðingarborðið í hesum árinum, og tí er tað sera umráðandi at Føroya Reiðarafelag finnur seg sjálvan aftur áðrenn ta tíð, so sjónleikurin ikki endurtekur seg.

Til komandi samráðingar er okkara uppskot, at vit avmarka samráðingarnar við Reiðarafelagið til tað, sum vit kundu nevnt høvuðssáttmálin ella felags reglur.

So kunnu samráðingarnar við ymisku skipabólkarnir snúgva seg um part tvey, serreglur.

Tá tað kemur til samráðingar við Strandferðsluna eru trupulleikarnir av øðrum slag. At útjaðaranum má tryggjast ferðasamband, tá arbeiðssteðgur er skilja feløgini væl og eru sinnaði at leggja samráðingarnar til rættis soleiðis, at hetta ikki verður nakar trupulleiki. Men tá má tað vera ein treyt, at Strandferðslan ikki feigar teir veruligi trupulleikarnar undir gólvteppið, tá samráðingar eru. Tað er eisini umráðandi, at manningarnar føla seg tryggar í teirra starvi.

Meðan samráðingarnar við Strandferðsluna fóru fram vóru fleiri av okkara politikarum frammi um málið, áðrenn sáttmálasamráðingarnar vóru lidnar.

Hetta skaddi samráðingarnar, og er ein av orsøkunum til, at enn er ongin semja funnin við Strandferðsluna.

*Vegna Føroya Skipara- og Navigatørfelag*
*og Maskinmeistarafelagið*

*Páll Hansen ábyrgdarblaðstjóri*




# Innihaldsyvirlit


Altjóða meistarar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 4

Tá skipslastin endar í brenniovninum . . . . . . . . . . 8

Maskinmeistarafelagið
aðalfundur og føðingardagur . . . . . . . . . . . . . . . . . . 12

Leivur Christiansen í brennideplinum . . . . . . . . . . 27

Maritimu útbúgvingarnar
eiga at uppstigast til bachelorstøðið . . . . . . . . . . . 28

Menn – hitt veikara kynið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 32

Tíðindi frá Føroya Skipara- og Navigatørfelag . . . 26

Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum . . . . . . . . . . . 28










# Altjóða meistarar

**FRÍYRKISMENN: Teir eru maskinmeistarar og allur heimurin er teirra arbeiðspláss. Vinmennirnir Kenneth Joensen og Petur Brodersen stovnaðu í 2006 sína egna fyritøku og hava í dag úr at gera sum free-lance-skipsinspektørar hjá fleiri víðagitnum reiðaríum**

*Tekstur: Dánjal Højgaard.*



*Kennet Joensen og Petur Brodersen manna fríyrkisfyritøkuna MES, sum hevur teknisk eftirlit við stórum og dýrum skipum á heimsins størstu skipasmiðjum.*

Tað byrjaði sum eitt hugskot millum vinmenn. Fyri at fáa tíðina at ganga og tjena nøkur eyka oyru millum túrarnar á felags arbeiðsplássinum hjá Maersk.

Í dag – skjótt fimm ár seinni – eru teir stjórar í egnari fyritøku. Eini fyritøku, sum veitir tekniska og mekaniska hjálp til skip og reiðarí um allan heim.

Frítíðarítrivið er blivið til eitt ábyrgdarfult fulltíðarstarv, sum 9-10 mánaðir av árinum fer fram í Singapore, Shanghai, Las Palmas, Barcelona og øðrum stórum havnum kring allan heimin.

## NÓGVAR DOKKINGAR

– Hettar lívið krevur, at tú hevur eina tolna konu, skemtar Petur og bjóðar burturav sjokolátuni frá eini av mongu flogferðunum.

– Tú skalt vera klárur at rykkja út, so skjótt teir ringja.

Báðir tveir eru 50 ára gamlir. Petur Brodersen og Kenneth Joensen, sum saman eiga smápartafelagið MES – Mecanical & Electrical Support – sum hevur skrivstovu á ovastu hædd í Gomlu Losjuni í Havn. Tað er haðani, at víðfevnda og spennandi freelancevirksemi teirra á heimsins størstu skipasmiðjum verður lagt til rættis.

Umframt umvælingar av ymiskum slagi og uppgávur í sambandi við skipabygging, er høvuðsuppgávan hjá MES at hava teknisk eftirlit við skipum, sum skulu í dokk til høvuðseftirlit.

Reiðaríini hava vanliga sínar egnu skipsinspektørar, sum fyrireika tey stóru eftirlitini og fara út á skipasmiðjurnar at fylgja við arbeiðinum. Men viðhvørt koma eftirlitini – dokkingarnar – upp í røkur, so at inspektørarnir ikki fáa verið úti á skipasmiðjunum sjálvir.

Og tá ringja reiðaríini til fríyrkismenn sum Petur og Kenneth.

## 100 SKIP Á AVRIKSLISTANUM

Síðani teir fóru at arbeiða fulla tíð fyri MES 1. januar 2008 hava Petur og Kenneth umvælt ella havt eftirlit við útvið 100 skipum. Bæði farmaskipum, tangaskipum, bingsjuskipum, fiskiskipum og ferðamannaskipum. Nógv eru donsk, men kundarnir koma eisini úr londum sum Norra, Týsklandi og Saudi-Arabia. Føroysk skip eru eisini á avrikslistanum. MES var ráðgevi, tá nýggir stabilisatorar vóru útvegaðir

# Skeiðskema 2011



| Nr. | Skeiðnavn | Dagar | DKK | april | mai | juni |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ARPA skeið<br>ARPA AUTOMATIC RADAR PLOTTING AIDS | 4 | 8.900 | 26 | | |
| 2 | GOC (Generelt certifikat sum radiooperatørur) Nýtt<br>GOC GENERAL OPERATOR CERTIFICATE (NEW) | 15 | 14.900 | | | |
| 3 | GOC-endurnýggjan<br>GOC GENERAL OPERATØR CERTIFICATE, RENEWAL OF COURSE | 7 | 7.000 | | 2 | |
| 4 | LRC (Avmarkað radioskeið)<br>LRC LONG RANGE CERTIFICATE | 7 | 8.900 | | | |
| 5 | LRC við Inmarsat<br>LRC LONG RANGE CERTIFICATE, WITH INMARSAT | 8 | 9.950 | | | |
| 6 | Tankers Safety serskeið fyri olju- gas- og kemikaliutangakip<br>TANKERS SAFETY, SPECIAL COURSE FOR OIL-, GAS- AND CHEMICAL TANKERS | 5 | 6.800 | | | |
| 7 | Flutningur av vandamiklum farmi<br>TRANSPORT OF DANGEROUS GOODS IN DRY CARGO SHIPS | 3 | 5.400 | 11 | | |
| 8 | Eftirútbúgving sum sjúkraviðgeri (Heilsulæra)<br>SUPPLEMENTARY TRAINING IN MEDICAL PROFICIENCY | 4 | 7.500 | | 16 | |
| 9 | Eftirútbúgving sum sjúkraviðgeri (Heilsulæra). um prógvið er eldri enn 10 ár<br>SUPPLEMENTARY TRAINING IN MEDICAL PROFICIENCY<br>WHEN CERTIFICATE IS OLDER THAN 10 YEARS | 10 | 12.000 | | | |
| 10 | ECDIS (elektroniskt sjókort)<br>COURSE IN ELEKTRONIC CART DISPLAY INDICATION SYSTEM | 4 | 8.900 | | 16 | |
| 11 | Endurnýggjan av vinnubrævi<br>RENEWAL OF MARITIME TRAINING CERTIFICATE | pr. dag | 1.500 | 4 | | |
| 12 | SSO-skeið<br>COURSE FOR SHIP SECURITY OFFICERS | 3 | 5.400 | | | |
| 13 | § 16-skeið<br>WORKING ENVIRONMENT §16-COURSE | 3 | 5.800 | | | |
| 14 | Ketilpassaraskeið. Skeiðið verður 5 fylgjandi fríggjadagar<br>COURSE AS BOLIER TENDER | 5 | 7.500 | | | |
| 15 | Eldsløkking umborð á skipi. STCW A-VI/1-2<br>FIRE FIGHTING ON BOARD SHIPS | 3 | 5.650 | 11 | 02<br>09<br>21 | 06 |
| 16 | Endurtøku eldsløkking umborð á skipi. STCW A-VI/1-2<br>REFRESHER COURSE IN FIRE FIGHTING | 1 | 2.900 | 14 | 12 | 09 |
| 17 | Sløkkileiðsla umborð á skipi. STCW A-VI/3<br>ADVANCED FIRE FIGHTING | 2 | 4.100 | | 5 | |
| 18 | Eldsløkking fyri skipsyvirmenn<br>FIRE FIGHTING FOR SHIPS OFFICERS | 5 | 9.750 | | 02 | |
| 19 | Sløkkiliðsfólk uttan sløkkibil. STCW A-VI/1-2 & STCW A-VI/3<br>ADVANCED FIRE FIGHTING FOR SHIPS OFFICERS | 5 | 8.650 | | | |
| 20 | Sløkkiliðsfólk við sløkkibili | 10 | 17.300 | | | |
| 21 | Brunaumsjónarmenn | 7 | 12.100 | | | |
| 22 | Venjing fyri sløkkilið | 1 | 1.800 | | | |
| 23 | Eldsløkking og bjarging í tunlum | 3 | 7.000 | | | |
| 24 | Grundleggjandi eldsløkking. (Fyri virkir, stovnar og einstaklingar) | 1 | 860 | | | |
| 25 | Grundleggjandi trygdarskeið fyri sjómenn. STCW A-VI/1-1, A-VI/1-3, A-VI/1-4<br>BASIC SAFETY TRAINING | 3 | 4.550 | | | 06 |
| 26 | Fult trygdarskeið fyri sjómenn. STCW A-VI/1-1,A-VI/1-2, A-VI/1-3, A-VI/1-4<br>BASIC SAFETY TRAINING | 6 | 10.260 | | | |
| 27 | Bátaføraraskeið. STCW A-VI/2-1<br>PROFICIENSY IN SERVIVAL CRAFT AND RESCUE BOATS | 4 | 4.700 | | | 14 |
| 28 | Medisinsk fyrstahjálp. STCW A-VI/4-1<br>MEDICAL FIRST AID | 4 | 6.000 | | | |

Vinnuháskúlin treytar sær rætt at avlýsa skeið, um ov fá eru tilmeldað.

Nóatún 7 · FO-100 Tórshavn · Tel 350 250 · Faks 350 251 · info@vh.fo · www.vh.fo

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

KREA · TEL 60 80 80

til Norrønu í 2009 og hevur eisini tikið sær av føroyskum fiskiskipum.

## GREINA OG HEINTA TILBOÐ

Arbeiðið sum freelance skipsinspektørur er ógvuliga fjølbroytt. Tað fer bæði fram við skrivaraborið í Havn og úti á teimum stóru skipasmiðjunum.

Tá ið skipini skulu til høvuðseftirlit skal eftirlitsarbeiðið fyrst útgreinast nærri. Hetta verður gjørt við eini sonevndari docking-specifikatión. MES ger ofta slíkar greiningar, mangan í tøttum samstarvi við skipasmiðjuna, greiðir Kennet frá og vísir okkum eina dockling-specifikatiónum, sum er einar 2-3 cm tjúkk.

Tá ið útgreiningin er liðug verður hon løgd fyri nakrar skipasmiðjur, sum sleppa at bjóða upp á arbeiðið. Síðani sleppa reiðaríini at bjóða upp á arbeiðið.




## STÓR ÁBYRGD Á STAÐNUM

Men størsta avbjóðingin er helst, tá ið skipini fara í dokk. Hetta hendir sum oftast á stórum skipasmiðjum í Shanghai í Kina, Singapore ella aðrastaðni í Asia, har arbeiðið verður gjørt bæði skjótt og bíliga.

Tá eru Petur og Kenneth altíð á staðnum í góðari tíð, so at teir kunnu taka ímóti skipunum og hjálpa teimum í dokkina.

Síðani ganga teir gjøgnum docking-specifikatiónina saman við skipasmiðjuni. Og hvønn morgun meðan skipið liggur í dokkini er statusfundur, har mett verður um arbeiðsgongdina.

## KNÍVSKORIN TÍÐARÆTLAN

– Tað er alfa og omega fyri reiðaríini, at arbeiði verður gjørt til tíðina. Hvør dagur, sum skipið ikki er í sigling, kostar reiðaríunum nógvar pengar, greiða MES-mennirnir frá.

Hetta er krevjandi og ábyrgdarfull uppgáva. Talan er um dýr og stór skip, heilt upp í 292 metrar. Ofta eru eini 100 smiðjufólk í sving í senn og arbeiðið kann kosta upp í 10 milliónur krónur. Og eitt høvuðs_ eftirlit, sum vanliga tekur einar 2 mánaðir í Føroyum, skal helst vera avgreitt eftir bert 3 vikum.

So her ræður um at hava tunguna mitt í munninum.

– Hava vit lovað, at skipið verður liðugt tann 20. í mánaðinum, ja so skal tað eisini vera tann 20. Har er eingin bøn. Reiðaríið er bundið av kontraktum. Seinkingar kosta reiðaríunum nógvar pengar og tá er vandi fyri, at vit ikki verða bidnir aftur, siga Kenneth og Petur, sum eisini skulu ansa eftir, at alt arbeiði verður gjørt sum tað skal.

– Tað ringasta, sum kann henda er, at eitt skip noyðist í dokk í úrtíð. Tað er øgiliga dýrt og má yvirhøvur ikki koma fyri, siga teir.

## EIN SPURNINGUR UM ÁLIT

Tá ið teir byrjaðu vóru teir fýra. Umframt Petur og Kenneth vóru eisini Palli Johannesen og Eyðun Samuelsen í fyritøkuni. Allir vóru teir maskinmeistarar. Tá ein tíð var fráliðin fóru Palli og Eyðun aftur í síni gomlu størv.



Petur og Kenneth hava onga uppskrift til hvussu tú klárar teg í hesi fríu vinnuni, har eingin veit, hvat morgindagurin hevur at bjóða. Men eitt er vist. Skal tú sum fríyrkismaður sleppa at hava tekniskt eftirlit við verkætlanum í milliónaklassanum fyri kend reiðarí sum Maersk og Clipper, mást tú hava tey røttu sambondini.

– Tað kom okkum sera væl við, at Petur hevði arbeitt sum skipsinspektørur hjá Maersk í fleiri ár. Tá ið vit byrjaðu fóru umleggingar fram hjá Maersk, sum gjørdu, at fleiri eftirlitsfólk fóru til onnur reiðarí at arbeiða. Hesi fólk vendu sær til okkara, tá ið brúk var fyri tekniskum eftirliti, sum teir ikki kláraðu sjálvir. Tað gjørdu tey tí, at tey kendu Petur og tí vistu, at tey kundu líta á okkum

– Uttan hesi sambondini hevði tað als ikki borið til, siga teir báðir freelance-skipinspektørnarnir, sum hava havt ein fyrimun av altjóða fíggjarkreppuni, tá ið teir skuldu byggja eina fyritøku upp:

– Fíggjarkreppan hevur gjørt, at fleiri reiðarí hava minkað um talið á inspektørum. Hetta hevur gjørt, at tað er størri tørvur á freelancefólki sum okkum, sum kunnu átaka sær uppgávurnar hjá inspektørunum.

## FAKTA

Eigarar í Sp/f MES – Mechanical & Electrical Support.

**Niklas Kenneth Joensen**, 50 ár.

- Maskinmeistari, Vinnuháskúlin.
- Maskinsmiður, Tórshavnar Skipasmiðja.
- Arbeitt sum maskinmeistari á fiski-, farma- og útgerðarskipum
- 14 ár hjá Maersk Supply Service, harav 7 ár sum chiefur.

**Peter Højgaard Brodersen**, 50 ár

- Maskinsmiður, Maskinfabrikken Bola, Gladsaxe, Danmark
- Maskinmeistari, Vinnuháskúlin.
- Víðkað maskinmeistaraprógv, Keypmannahavn.
- Elektrikari/elinstallatør, Leif Mohr.
- Arbeitt sum elektrikari og maskinmeistari við fiski- og farmaskipum.
- Hjá APM-Maersk í 17 ár, harav 2 ár sum maskinmeistari og 15 ár sum skipsinspektørur.

# Tá skipslastin endar í brenniovninum

**Tað, sum svarar til allan fiskin hjá einum líniskipi, endar í brenniovnunum á Sandvíkarhjalla og Høgaleiti, tí hagreiðingin umborð er so vánalig. Samanlagt fara 100 milliónir krónur fyri skeyti og umdømið hjá Føroyum á evropeisku saltfiskamarknaðunum versnar. Tað vísa kanningar, sum Jákup Poulsen í felagnum Inspect hevur gjørt. Loysnin er at herða reglurnar fyri hagreiðingin og túralongd, heldur Jákup Poulsen, sum tosar um eina neyðuga hugburðsbroyting.**

*Tekstur: Helgi Jacobsen*



*Jákup Poulsen leggur dent á, at tað alla tíðina er neyðugt við menning. „At standa í stað er tað sama sum afturgongd, og tá verður tú yvirhálaður av kappingarneytunum," sigur hann. Mynd: Helgi Jacobsen*

Hann stendur á pallinum í Norðurlandahúsinum á Fiskivinnutinginum 22. mars. Hann hevur fingið 20 minuttir at opna eyguni á vinnuni og myndugleikunum fyri einum sorgarleiki, har evnið er føroyski saltfiskurin.

Sjáldan sært tú ein persón, sum brennir so nógv fyri tí, sum hann ber fram. Ein fyri og annar eftir koma sannleikarnir á stórskíggjan og brenna seg inn í hornhinnuna á áhoyrarunum. Sannleikarnir verða javnt og samt væl undirbygdir við sannførandi orðum, ið festa seg í heilakyknurnar innanvert oyragongina.

Tá teir 20 minuttirnir eru farnir og áhoyrararnir fáa tøkk fyri at hava lýtt á, er einki meira at spyrja um.

**FAKTA**

Kanningarnar vísa, at 90% av fiskinum er nr. 1, tá túralongdin er niðan fyri fimm dagar. Fer túrurin upp á átta dagar, eru 80% nr. 1, og fer túrurin upp á 12 dagar, eru bara 50% nr. 1. Og tað hendir tíverri ikki so sjáldan, at túrarnir fara upp um 12 dagar, og tá eru bara 25% fyrstafloks fiskur.



*Saltfiskur góðska 2*



*Saltfiskur góðska 2 til Góðska 1 – 5% fráskurður*



*Saltfiskur vrak*



*Saltfiskur vrak til góðsku 2 – 9% fráskurður*

Boðskapurin darrar nakin í stórhøll. Fólk sita sum kánus. „Eg visti ikki, at tað var so galið", sigur ein við síðumannin. Ein annar heldur fyri, at hetta er stór skomm fyri okkara land og at landsstýrismaðurin má upp í leikin. Í kaffisteðginum aftaná tosar eingin um annað enn teir 33 trailararnar av saltfiski, sum hvørt ár enda í brenniovnunum. Altljóðandi spurningurin yvir kaffikoppinum er: „Hvat gera vit?"

## KANNAÐ OG UNDIRBYGT

Jákup Poulsen hevur fiskivinnuútbúgving og hevur seinastu 10 árini arbeitt við saltfiskaframleiðslu. Nú hann hevur stovnað sína egnu fyritøku, Inspect, hevur hann lagt seg eftir at menna føroyska saltfiskin og hann setir fokus á úrtøku og góðsku.

Endamálið við framløguni hjá Jákupi Poulsen var at upplýsa um samanhangin millum rávørugóðsku øðrumegin og saltfiskagóðsku, úrtøku og endamarknaðin hinumegin. Spurningarnir, sum hann setir bæði sær sjálvum og øðrum er, um verandi støða er nøktandi og um vit kunnu fáa meira burtur úr línifiskinum.

Svarið er sera greitt. Vit kunnu fáa væl meira burturúr og tí er støðan ikki nøktandi. Jákup Poulsen heldur ikki, at tað er viðkomandi at peika á syndabukkar. Ístaðin vísir hann á, at veruleikin má fáa avvarandi partar at vakna, soleiðis at neyðug stig verða tikin til tess at bøta um viðurskiftini.

Tað hevur í eina tíð verið greitt fyri framleiðarunum, at tað gekk tann skeiva vegin við føroyska saltfiskinum. Jákup Poulsen setti sær tí fyri at kanna viðurskiftini, bæði á marknaðinum og í framleiðslutilgongdini í Føroyum. Kanningarnar eru loknar og boðskapurin klárur at leggja fram.

## MISTU GÓÐU MARKNAÐARSTØÐUNA

Føroyskir saltfiskaframleiðarar komu fyri 15 árum síðani nakrar longdir fram um grannarnar Ísland og Noreg. Vit gjørdu tað mesta rætt eftir at føroysku saltfiskaframleiðararnir sum teir fyrstu byrjaðu at spræna saltlaka inn í fløkini í staðin fyri at salta upp á gamla mátan.

Føroyskur saltfiskur við føroyska merkinum borgaði fyri góðsku og brúkarin vildi fegin rinda meira fyri føroyskan saltfisk. Ikki minst vóru eyðsýndu vøddarnir í fløkunum av Føroyabankatoskinum sermerktir fyri saltaðan tosk úr Føroyum. Føroyski fiskurin skildi seg frá øðrum toski og tað gav hægri prís.

Men fyri tveimum-trimum árum síðani kom broyting í. Inntøkan, sum fyri hvørt kilo av føroyskum saltfiski í eitt langt tíðarskeið hevði verið 10 prosent hægri, enn inntøkan á íslendskum saltfiski, fall í

2009 10 prosent undir inntøkuna av íslendska saltfiskinum. Sambært kanningunum hjá Jákupi Poulsen er tað vantandi góðskan á føroyska toskinum, sum er orsøkin. Ov lítið er góðska 1 og føroyskur saltfiskur skilir seg ikki longur frá øðrum saltaðum toski.

„Stóra hóttanin er, at Føroyar sum framleiðari og útflytari fáa eitt vánaligt umdømi", sigur Jákup Poulsen. „Tá spanska húsmóðurin fer til handils, hyggur hon ikki eftir, um Morgunstjørnan hevur fiskað fiskin ella um hann er saltaður á Vaðhorn ella í Gøtu. Hon velur fiskin eftir upprunalandi og hon fer fyrst og fremst eftir litinum. Hevur íslendska ella norska saltflaki betri lit, enn tað føroyska, keypir hon tað íslendska ella tað norska. Hetta er vanlukkan, sum er ávegis fyri føroyskan saltfisk," sigur Jákup Poulsen.

Hann tekur sum dømi, at ein føroyingur hugsar ikki um, frá hvørjum garði í Íslandi ella Nýsælandi lambskjógvini koma. Vit hyggja at upprunalandinum. Er tað íslendska ikki nóg gott, velja vit tað nýsælandska næstu, triðju og fjórðu ferð, vit fara til handils.

## BARA TAÐ BESTA NÓG GOTT

Tær kanningar, sum Jákup Poulsen hevur gjørt, vísa sum nevnt, at vantandi rávørugóðska er atvoldin til, at føroyski saltfiskurin ikki longur skilir seg frá øðrum fiski. Umframt at ein munandi partur fer burtur, er saltfiskurin ikki nóg ásýniligur, tá spanska senoritan ella italski kokkurin skulu velja, hvat tey vilja borðreiða við.

Í fyrsta lagi verður nógvur fiskur frá línuskipum skeivt blóðgaður. Í øðrum lagi vísa kanningarnar, at túrarnir eru ov langir.

„Tað ber ikki til at fáa góðan saltfisk, um ráfiskurin ikki er góður, tá virkini keypa hann. Blóð í fløkunum má tí skerast frá, áðrenn fløkini kunnu útflytast, og mangan er tá ikki longur talan um eitt flak í eygunum á sponsku húsmøðrunum," sigur Jákup Poulsen, og nevnir síðani túralongdirnar.

„Kanningarnar vísa, at 90 prosent av fiskinum er góðska 1, tá túralongdin er niðan fyri fimm dagar. Fer túrurin upp á átta dagar, eru 80 prosent góðska 1 og fer túrurin upp á 12 dagar, eru bara 50 prosent nummar 1. Og tað hendir tíverri ikki so sjáldan, at túrarnir










*Í 2008 fall virðið á tí føroyska saltfiskinum pr. kg niður um virðið á tí íslendska saltfiskinum pr. kg.*

fara upp um 12 dagar, og tá eru bara 25 prosent fyrstafloks fiskur."

## ÚRTØKAN MINKAR

Umframt at Føroyar missa góða umdømi á saltfiskamarknaðunum, so minkar úrtøkan av dýrabæru rávøruni. Tá gamal og bleytur fiskur ferð gjøgnum maskinurnar á virkjunum, sæst hetta aftur frá avhøvding til reinskering. Prosessin gerst drúgvari og truplari. Bara fyri reinskering tosa vit um einar 20 mió. kr. eyka í lønarkostnaði, sum virkini sleppa undan at gjalda, tá fløkini koma frá nýggjum og rætt hagreiddum ráfiski.

„Harafturat hevði betri góðska givið tvær krónur hægri í miðal fyri kilo. Tað svarar til 40 mió. kr. árliga. Betri úrtøka hevði givið 30 mió. kr. og lønarlækkingin sum nevnt 20 mió. kr. Íalt hevði føroyska saltfiskavinnan fingið 4,50 kr. meira fyri hvørt kilo av ráfiski, um alt var besta góðska. Tað svarar til 90 mió. kr. árliga. Hildu vit okkum til hendan leistin, fóru eftirspurningurin og prísurin upp. Tá tosa vit um upphæddir, sum liggja frá 100 mió. kr. og uppeftir," sigur Jákup Poulsen.

Tað, sum krevst, heldur hann, er at fokus verður sett á øll lið.

„Fiskurin skal bløðgast og bløða út í sjógvi, áðrenn hann verður kruvdur. Síðani skal hann kryvjast og kølast skjótt við nógvum ísi og búkinum niðureftir. Reglur mugu koma fyri túralongd og góðsku-eftirlitið má herðast munandi. Og eftir míni meting má hugburðurin broytast og vitanin um fiskaframleiðslu betrast," sigur Jákup Poulsen.

## 33 TRAILARAR Í BRENNIOVNIN

Tað er mátin og dømini, ið Jákup Poulsen brúkar, sum fáa fólk at vakna. Hann tosar um eina vanlukku, sum er á veg, um vinnan ikki tekur seg saman. Onkur vildi sagt, at fimm prosent fráskurðir ikki er so ógvisligt. Men tá Jákup Poulsen á Fiskivinnutinginum setti tað í perspektiv og tosaði um, at hetta svarar til alla veiðuna hjá einum línuskipi í eitt heilt ár, mátti sjálvt fiskimálaráðharrin rætta seg upp í stólinum.

Myndin gerst grefligari, tá vit síggja fyri okkum 33 trailarar av spiltum, saltaðum toski ávegis til brennistøðina, har 30 mió. kr. í orðsins sanna týdningi fara upp í royk. Annað eigur at verða brúkt at hita hoyvíkingar ella at turka toskarhøvd.


**Afturfingin goymslumerki geva týdningarmikla vitan um ferðing hjá havtasku**



Higartil hava goymslumerkini víst, at havtaska størri enn 70 cm ferðast meir enn væntað, bæði upp í sjógvin og niður á stór dýpi. Serliga áhugavert er, at hon fer niður á uml. 400 metra dýpi um veturin, helst fyri at gýta. Um so er, so hava goymslumerkini staðfest, at havtaska gýtir í føroyskum sjógvi. Jú fleiri merkir Havstovan fær inn, jú vísari verða vit í staðfestingini av m.a. gýtingarøkinum.




**Fiskur verður merktur til tess at kanna ferðingarmynstur, útbreiðsluøki og vøkstur**



Um merktur fiskur verður fiskaður, ynskir Havstovan upplýsingar um merkjanr., fiskidato, positión, fiskalongd, skip, innsendara, bústað og kontonr.
Aftrat fiskamerkinum er sera gott, um Havstovan fær fiskin eisini. Afturfyri fær innsendarin bæði pening og lutaseðlar, og er við í dráttinum um kr. 12.500,- hvørt heyst.

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

P.O. Box 3051 · Nóatún 1
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 35 39 00
hav@hav.fo
www.hav.fo



# MASKINMEISTARAFELAGIÐ
## – aðalfundur og føðingardagur

Stríðsval um formansstarvið og søguligar lógarbroytingar stóðu ovast á dagskránni, tá ið Maskinmeistarafelagið kallaði saman til aðalfundar leygardagin 19. mars.

Aðalfundurin varð hildin á Parnassinum á Hotel Hafnia og útvið 50 mans høvdu sett hvør øðrum stevnu hendan seinnapartin at viðgera felags fakligt áhugamál.

Klokkan var farin av 14, tá ið fundarstjórin Turið Debes Hentze, advokatur, setti fundin. Tá ið hon endaði fundin góðar tríggjar tímar seinni var formanssessurin mannaður av nýggjum og avgerð tikin um at Maskinmeistarafelagið um eitt ár skal hava ein fastløntan formann.

Aðalfundurin vísti eisini, at limirnir í Maskinmeistarafelagnum hava nógvar og sterkar meiningar um hvørt tað er rætt at umskipa Maskinmeistaraútbúgvingina til bachelorútbúgving. Eisini var eitt gott kjak um inntøkuviðurskiftini og raðfestingar hjá felagnum. Og ikki minst varpaði aðalfundurin ljós á tær nýggju avbjóðingar, sum standa fyri framman hjá Maskinmeistarafelagnum, nú arbeitt verður at skipa viðurskiftini hjá teimum útlendsku sjófólkunum í føroysku altjóða skipaskránni FAS.



Maskinmeistarafelagið varð stovnað 29. apríl 1941; sostatt hevur felagið 70 ára føðingardag 29. apríl í ár. Í hesum sambandi varð føðingardagsveitsla hildin um kvøldið eftir aðalfundin.

# FORMANSFRÁGREIÐING 2010

Í heyst segði Føroya Reiðarafelag sáttmálarnar upp við tey trý manningarfeløgini.

Á fundi 29. oktober 2010 løgdu Føroya Reiðarafelag og manningarfeløgini krøvini fram. Mann_ ingarfeløgini møttu hvør sær.

Reiðarafelagið kravdi millum annað, at allir skipabólkar skuldu hava netto sáttmálar og, at tað var eitt prinsipp, at allir yvirmannapartar skuldu regulerast niðureftir.

Harumframt vóru ynski um dagføringar og tillagingar í felagsreglunum.

Samanumtikið kann sigast at krøvini hjá Føroya Reiðarafelag vóru ræ̈ttuliga umfatandi.

Felagið gjørdi nakrar útrokningar út frá hesum uppskoti og vísti hettar lønarniðurskurð heilt upp til 40%.

Krøvini hjá MF vóru ræ̈ttað ímóti at fáa størì trygd í arbeiðinum, tað vil siga at setanar- og lønarviðurskifti skuldu dagførast, og vit ynsktu at útgreina fastlønarsáttmálarnar meira.



*Viberg Sørensen formaður í Føroya Reiðarafelag*

*Páll Hansen formaður*





## SAMSTARV MILLUM MANNINGARFELØGINI

Tað bleiv til nakrar fundir við Føroya Reiðarafelag, onkur teirra var langur, tað verður ov drúgt her at greiða frá øllum tí, sum er farið fram á hesum fundum. Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið samráddust saman og samstarvi millum feløgini virkaði væl.

Men sum tit vita, endaðu hesar sáttmálasamráðingar við sliti og semingsmenninir vórðu boðsendir.

Semingsroyndirnar byrjaðu tann 14. januar og nú samráddust øll manningarfeløgini saman. Mánadagin 17. januar komu semingsmenninir til ta støðu, at partarnir stóðu so langt frá hvørjum øðrum, at semingsmaðurin metti ikki, at grundarlag var fyri at seta nakað semingsuppskot fram.

Síðani lýsti Føroya Reiðarafelag verkbann og flotin bleiv innkallaður.

Tann 28. boðaðu semingsmenninir frá, at teir vildu gera eina semingsroynd. Semingsuppskot bleiv fram lagt um midnáttarleitið. Uppskoti bleiv góðtikið av Føroya Reiðarafelag, men vrakað av manningarfeløgunum.

Reiðarafelagið boðaði frá, at verkbannið varð avtikið og at felagið gjørdi ikki meira við hetta mál. Við øðrum orðum gav Føroya Reiðarafelag samráðingarræ̈ttin frá sær.

Manningarfeløgini boðaðu limum sínum frá, at tað var í lagi at mynstra eftir gamla sáttmálanum meðan sáttmálaloysið var.

Manningarfeløgini fóru tann 3. februar undir samráðingar við teir ymisku skipabólkarnar og eftir at hava fundast í 14 dagar, har eisini leygardagar og sunnudagar vóru nýttir, og fleiri av fundinum vóru drúgvir. Semja varð undirskrivað við tann síðsta skipabólkin tann17. februar 2011.

Men eftir stendur spurningurin um Føroya Reiðarafelag bara kastar frá sær, tá teir eru koyrdir fastir.




Hetta hava teir gjørt áður, nevniliga í 2005 og tað skapar ikki álit millum partarnar.

## ALMENT LØNT Á LANDI OG Á SJÓGVI

Samráðingar byrjaðu síðst í september 2010 við Fíggjarmálaráðið (FMA) og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið (KAF), sum samráddust saman hesa ferð.

Vit hava í alt 5 sáttmálar her. Teir eru SEV, SSL og alment settar á landi, harafturat kemur Magnus Heinason og tænastumenn hjá Fiskiveiðieftirlitinum. Tað bleiv til 4 fundir tá vit konstateraðu, at vit kundu ikki semjast.

Um sama mundi slitnaðu samráðingarnar millum FMR, KAF og samráðingarbólkin fyri tey 5 fakfeløgini sum samráddust saman og semingsmenninir blivu boðsendir.

Vit samdust við FMR og KAF, at vit skuldu bíða við okkara samráðingum til 1. desember. Semja bleiv millum fakfelagssamstarvið og tey 5 fakfeløgini um ein karm upp á 1 %. Vit fingu sama tilboð, men valdu tó at leggja alla hækkingina upp á eftirlønina. Tað vórðu eisini onkrar smávegis broytingar og dagføringar gjørdar.

Hesin sáttmálin er stuttur, bert 1 ár.

Sáttmálin hjá SSL bleiv ikki gjørdur og avgjørt bleiv í staðin, at royna at samráðast sama við FSN og loysa hettar mál í felag. Hesar samráðingar hava verði nakað trekar.

Um hettar mundi vóru fleiri av okkara politikarum frammi um, at strandfaraskipini ikki mugu liggja, tá arbeiðssteðgur er og, at útjaðaranum má tryggjast ferðasamband.

Maskinmeistarafelagið skilir hetta væl og kann gott taka undir við hesum, men ein fyrsta treyt er, at tey veruligu problemini ikki verða fjald undir gólvteppinum, tá ið samráðingar eru.

Fundur var í Fíggjarmálaráðnum um hetta málið tann 26. januar. MF boðaði frá á hesum fundi, at vit mugu fyrst fáa sáttmálan upp á pláss, áðrenn man fer at tosa um strandferðsluna undir verkfalli.

Samráðingarnar vóru uppafturtiknar um mánaðarskifti februar, mars, men eftir tríggjar fundir varð greitt, at partarnir kundu ikki semjast, og vórðu semingsmenn tí boðsendir.

Tað er serliga arbeiðstíðin, sum partarnir ikki eru samdir um. Feløgini hava kraft, at 49-tíma vikan lækkar og, at arbeitt verður eftir MLC-konventiónini.

## FARMASKIP

Sáttmálin við Reiðarafelagið fyri Farmaskip er uppsagdur til at fara úr gildi 1. mars. Dagføringar eru neyðugar serliga fyri frálandaskipini.

Felagið hevur sett sær fyri, at fáa hesar sáttmálar upp á sama støðið sum í okkara grannalondum. Men eitt er málsetningur eitt annað er veruleiki, vit fáa ikki javna hendan mismun í einum sáttmálaskeiði.

Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag boðaðu til fundar um hendan sáttmálan síðst í februar fyri at hoyra, hvat limirnir meintu.

Vit hava fingið boð um, at formaðurin í Reiðarafelagnum verður uttanlands ein stóran part av mars, so ikki er greitt, nær farast kann undir samráðingar.

## FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG

Hesin sáttmálin er uppsagdur til 1. juni 2011.

## MOTORPASSARAFELAGIÐ

Tann 28. mai 2010 varð avtala undirskrivað um, at limir í Føroya Motorpassarafelag verða fluttir yvir í Maskinmeistarafelagið og samstundis yvirtók Maskinmeistarafelagið ognir og skyldur hjá Føroya Motorpassarafelag. Maskinmeistarafelagið varar nú av sáttmálaviðurskiftum hjá øllum, sum starvast í maskintænastu á sjógvi og landi.

## INNTØKUTRYGD HJÁ FISKIMONNUM

Inntøkutrygdin er ein skipan, ið upprunaliga stavar frá 1947. Skipanin var at byrja við fíggjað av vinnuni sjálvari. Tann skipanin um inntøkutrygd, sum fór úr gildi 1. januar 2011 var frá 1969 og hon var fult goldin av landskassanum.

Inntøkutrygdin er nú løgd út til reiðararnar og manningarnar sjálvar og hetta fer at kosta eitt ella tvey prosent av veiðuni.






Stovnsfæið hjá grunninum bleiv 50 milliónir. Tað er ongin loyna, at manningarfeløgini meina at hetta tal er nakað lágt og at tað eru for nógvar bindingar á vinnuni. Stýrið fyri grunnin skuldi veljast í januar í ár og ætlanin var, at teir, sum vóru í arbeiðsbólkinum eisini skuldi sita í tí fyrsta stýrinum, men her kom tíverri stígur í.

Orsøkin til hettar var, at Føroya Reiðarafelag ikki góðkennir Meginfelag Útróðrarmanna sum reiðarafelag og noktaði tí at skriva undir. Men hesin trupulleiki bleiv loystur síðst í februar. Stýrið fyri Inntøkutrygd Fiskimanna er nú valt, og farið til arbeiðis.

## ATHENA OG POSEIDON

Tann 25. august sendi Maskinmeistarafelagið ein fyrispurning til Útlendingastovuna. um útlendingarnar umborð á hesum skipum.

Maskinmeistarafelagið er av teirri meining, at útlendingar umborð á føroyskum skipum, sum eru í føroyskum sjógvi og fiska



av føroyskari kvotu, skulu hava arbeiðsloyvi í Føroyum.

Svarið var hettar:

*„Viðvíkjandi spurninginum um arbeiðsloyvi til útlendska manning á skipinum Athenu og Poseidon skal Útlendingastovan vísa á, at útlendingaøkið er dansk málsøkið og at allar umsóknir um arbeiðsloyvi skulu latast danska Udlændingeservice, sum eisini tekur avgerð í málum um arbeiðsloyvi í Føroyum. Útlendingastovan er hinvegin vegna Innlendsimálaráðið hoyringsmyndugleiki í slíkum málum. Hetta merkir m.a. at tá søkt er um arbeiðsloyvi í Føroyum vera umsóknirnar sendar okkum til hoyring, áðrenn danski myndugleikin avgerð málið. Útlendingastovan, hevur ikki fingið mál um Athenu og Poseidon í hoyring frá Integratiónsministeriðnum.“*

Í danskari lóggávu verða fabriksskip definerað sum handilsskip og í hesum førinum vóru skipini defineraði sum „modtagerskibe“, so kann man undrast, hvussu tað ber til, at „modtagerskib“ eisini kann hava fiskirættindi.

Tað visti seg eisini, at skip kundu liggja á Kollafirði og landa, uttan at hettar bleiv definerað sum føroysk havn. Man skuldi bert hava eitt skip við fremmandum nationaliteti liggjandi millum seg og keikantin so var alt í lagið.

Eisini bar tað væl til, at geva fiskiloyvi til skip við ongum motori, fylgjan av hesum var at kvotan bleiv ikki uppfiskað.

Manningarfeløgini blivu boðin til fundar við Anniku Olsen landsstýriskvinnu og tað bleiv til tríggjar fundir. Niðurstøðan var, at útlendingakunngerin skuldi strammast upp, men enn hevur man ikki hoyrt um nakra uppstramming. Her hendur onki.

## FAS OG FMU

Tann 2. juli varð undirskrivað ein avtala um samstarv millum føroysku sjómannafeløgini. Nýggi felagsskapurin hevur fingið navnið Faroese Maritime Unions, stytt FMU.

Endamálið við hesum tiltaki er at fáa í lag skipaði sáttmálaviðurskifti fyri útlendsk sjófólk, ið sigla við skipum í Føroysku Altjóða Skipaskránni. FMU skal eisini umboða hesi sjófólk mótvegis reiðarum, viðkomandi myndugleikum og í millumlanda fakfelagssamstarvi.

Hvørt felag velur eitt umboð í nevndina og í fyrstu nevndini í FMU sita Eyðstein Djurhuus, Jan Højgaard og Páll Hansen.

FMU hevur haft fundir við fleiri reiðarar, sum hava ætlanir um at flagga inn og tað eru gjørdar avtalur fyri yvirmenn við Furetankers og MMT.

Svitzer hevur boðað frá, at teir í ár koma við 10 av teirra sleipibátum og eru sinnaðir, at gera eina avtalu við FMU.

Samráðingar eru í gongd við

fakfelagið AMUSUP á Filipsoyggjunum fyri at fáa avtalur fyri manning Vinnuhúsið stendur fyri hesum samráðingum.

Hettar hevur nú tikið so langa tíð, at útlendskir reiðarar eru farnir at ótolnast álvarsliga.

FMU kemur nokk eisini at gera sáttmálar um pólskar og ukrainskar sjómenn.

Tað er so, at Meksiko City avtalan hjá ITF, sum bleiv avtalað í august 2010, leggur upp til, at fakfeløg úr flaggstatinum hjá skipinum og fakfeløg úr heimlandinum hjá sjómanninum gera kollektivan sáttmála sínámillum.

Vit vóna at fáa slíkar avtalur skjótt, so vit fáa inntøkur til FMU. Hettar er heilt vanligt í okkara grannalondum.

Síðst í februar fingu vit bræv frá ITF, har teir gera vart við, at teir hava móttikið eina áheitan frá Norsk Sjømannsforbund um at fáa lista FAS sum hentleikaflagg, altso FAS á FOC listan hjá ITF. Føroysku feløgini skulu lata viðmerkingar inn áðrenn 22-03-2011. Manningarfeløgini arbeiða saman við FAS umsitingini og Reiðarafelagnum um at kunna ITF so væl sum gjørligt um okkara viðurskifti og vísa á, at vit hava ein væl skipaðan arbeiðsmarknað, við drúgvari royndum at gera sáttmálar. Feløgini fara um neyðugt á fund við ITF í hesum máli, hetta arbeiðið skal gerast til lítar so FAS ikki endar á FOC.

## FORMAÐURIN Í FAST STARV

Higartil hevur formansstarvið í Maskinmeistarafelagnum verið framíhjáarbeiði, men nevndin hevur nú í hyggju at fáa hetta broytt soleiðis, at formaðurin skal vera í føstum løntum starvi. Tær neyðugu lógarbroytingarnar verða lagdar fram á aðalfundinum i dag.

Miðað verður ímóti, at fyrsti formaðurin í føstum starvi skal veljast




á ársaðalfundinum í 2012 og at formansskeiðið tá verður 3 ár.

Grundgevingarnar fyri at fara yvir til at hava formannin í føstum starvi kunnu vera fleiri. Felagið fær nýggjar uppgávur at røkja, til dømis FAS og FMU krevja meir av formanninum. Her er neyðugt at seta seg betur inn í fleiri lógarverk sum til dømis lógir og reglur hjá ITF.

Blaðútgáva krevur eisini sítt. Nú er formaðurin í Maskinmeistarafelagnum eisini ábyrgdarblaðstjóri og hetta kann skjótt fara við nógvari tíð.

Tann sum lesur tíðindini frá Maskinmeistarafelagnum í Mið og Magn sær, hvussu stórt fundarvirksemið er hjá felagnum. Harumframt er formaðurin í ymiskum nevndum, eitt nú Inntøkutrygd Skipsfiskimanna, og limur í tilvísingarbólkinum um at seta í verk uppstigan av útbúgvingunum til bachelorstøði, sjóvinnuráðið o.a. So tíðin røkkur heilt einfalt ikki til at náa øll tey mál, sum man helst skuldi fyri at røkja áhugamálinum hjá liminum optimalt.

Skrivstovan hevur nokk í tí dagliga, so illa ber til at leggja fleiri uppgávur har.

## VINNUHÁSKÚLIN

Maskinmeistarafelagið hevur nú í nøkur ár víst á, at tað er neyðugt at lyfta útbúgvingina hjá maskinmeistarum upp á bachelor stig fyri at koma á sama støðið sum okkara grannalond.

Tað gleðir okkum, at hettar nú sær út til at blíva veruleiki á Vinnuháskúlanum frá august 2012 í samstarvið við Fróðskaparsetri.

Vit meta, at hetta fer at geva maskinmeistarum eina betri støðu í tí altjóða kapping, sum er í væntu, serliga frá láglønarlondum, umframt betri møguleikar fyri víðari hægri lestri.

Útbúgvingin til maskinist skal so í framtíðini verða í Klaksvík burtur av. Í einum sterkum maritimum depli í samstarvi við Tekniska Skúlan í Klaksvík.

Maskinmeistarafelagið ynskir hesum maritima depli alt gott og vónar at vit fara at síggja ein klassa av maskinistum árliga.

Vit hava eisini eitt ynski um, at tað kemur eitt útbúgvingarráð fyri





hendan depil, har vinnan eisini er umboðað.

Tað síðsta í hesum máli er, at tað er settur ein arbeiðsbólkur at uppstiga verandi útbúgvingar til bachelorstøði, harumframt er settur ein tilvísingarbólkur.

Fyrsti fundurin hjá arbeiðsbólkunum var 28. februar, og fór arbeiðsbólkurin undir arbeiðið beinanvegin.

## NMF

Tað skuldu vera tveir NMF fundir í 2010. Ein í Føroyum í apríl, men hesin bleiv avlýstur vegna vánalig veður.

Ein var so í Reykjavík tann 7. oktobur 2010.

Á skránni har var m.a. val av leiðslu í NMF. Hetta verður gjørt triðja hvørt ár, eftir fastari skipan. Finnland tók við leiðsluni og Lars Wikstrøm við sum forseti eftir Per Jørgensen úr Danmark.

Um 3 ár eigur Maskinmeistarafelagið tørn til at taka við leiðsluni í NMF.

Meksiko City politikkurin hjá ITF bleiv eisini umrøddur. FAS kontra NIS og NOR bleiv eisini nógv umrøtt. Føroyska flaggið var eisini umrøtt. Vit eru framvegis á gráa listanum hjá „Paris MOU“, men tað gongur rætta vegin, og vónandi eru vit á hvíta listanum síðst í 2011. Útlendskir reiðarar spyrja ofta, hví Føroyar ikki eru á hvíta lista hjá „Paris MOU“,

## LIMAGJALD, PENGAR OG OGNIR

Nevndin hevur ongar ætlanir at gera broytingar í limagjaldinum og felagið er væl fyri fíggjarliga.

Á nevndarfundi tann. 4. februar góðtók nevndin at fara undir útgjald til teir limir sum lógu í sáttmálaloysi og goldið hevur verið út til um leið 60 limir.

Felagið sendi nakrar av sínum álitismonnum á Fakfelagscruise við Norrønu í september, har høvuðsevnini vóru álitisfólkaskipanir.

Eftirmetingarnar eftir túrin hava verið sera góðar.

Størsta ogn hjá felagnum er, saman við innistandandi peningi, húsini við Grønlandsvegin.

## MIÐ OG MAGN

Nú blaðið MIÐ & MAGN er komið út í u.l. 2 ár, kann ikki sigast annað enn, at blaðið er við at finna sín fasta form og ábendingar eru um, at limirnir dáma blaðið væl.

Í februar tók formaðurin í MF við sessinum sum blaðstjóri..

## 70 ÁRA FØÐINGARDAGUR

Flestu okkara fara í veitslu í kvøld nú felagið skjótt hevur 70 ára dag. Tað var týskvøldið tann 29. apríl í 1941, at 25 mans komu saman í Avhaldshúsinum í Havn og Føroya Maskinistfelag var stovnað við virkisstaði í Havn.

Felagið hevur síðani broytt navn, í 1963 bleiv navnið broytt til Føroya Maskinmeistarafelag, og í 1981 til Maskinmeistarafelagið.


lív.fo
Fá eitt ríkt lív
Lív hjálpir tær at fáa tað fíggjarliga í trygga legu
Hvør eftirløn hóskar best til tín?
Lív bjóðar sær at laga tína eftirløn til tað lívið, tú vilt liva, og ta framtíð, tú hevur útlit til.
Kom inn á liv.fo og fá innlit í, hvør eftirløn hóskar best til tín.
Trygg eftirløn
Eftirlønin mennist javnt og støðugt, og tú fært trygd fyri fastari veiting.
Samansett eftirløn
Tað besta úr báðum: tú fært tryggleika, umframt møguleika fyri størri avkasti.
Marknaðareftirløn
Íløgan fylgir marknaðinum, og gevur møguleika fyri ávirkan og størri avkasti.
Innlit í útlit




# STRÍÐSVAL OG KJAK UM FÍGGJARLIGAR RAÐFESTINGAR

**Páll Hansen varð afturvaldur til formann í Maskinmeistarafelagnum. Áðrenn formansvalið tóku limirnir støðu til tvey ítøkilig uppskot, sum bæði snúðu seg um hvat Maskinmeistarafelagið eigur at nýta limainntøkurnar til, nú felagið er fíggjarliga væl fyri**

Tað var stríðsval um formanssessin í Maskinmeistarafelagnum á aðalfundinum 19. mars.

Fyrrverandi formaðurin Finnleif Guttesen bjóðaði seg fram aftur til formansstarvið. Men tá ið atkvøðurnar vóru taldar á Parnassinum var greitt, at sitandi formaðurin Páll Hansen var afturvaldur og skal stjórna felagnum eitt ár afturat.

Sigurin var greiður. Páll Hansen fekk 51 atkvøður. Finnleif Guttesen fekk 6 atkvøður. Umframt teir umleið 50 limirnar, ið møttu hendan seinnapartin á Hotel Hafnia, vóru eisini nakrir limir, sum høvdu nýtt møguleikan, at greiða brævatkvøðu.

## KJAK UM TVEY UPPSKOT

Upptaktin til formansvalið var eitt áhugavert kjak millum limirnar um hvussu Maskinmeistarafelagið kann nýta limakrónurnar á skilabestan hátt, nú felagið hevur havt avlop fleiri ár á rað.

Bakgrundin til hettar kjak vóru tvey ítøkilig uppskot. Annað kom frá Pálli Hansen og nevndini í felagnum. Hitt frá avbjóðaranum í formansvalinum Finnleifi Guttesen.

Uppskotið frá nevndini var at broyta lógina fyri Maskinmeistarafelagið, so at formansstarvið verður eitt lønt fulltíðarstarv.

Sambært uppskotinum hjá Finnleifi Guttesen skuldi aðalfundurin heldur samtykkja, at felagið á hvørjum ári setir av 500.000 krónur at stuðla limum, ið vilja sleppa á skeið. Grundgevingin fyri hesum uppskoti var, at royndirnar hava víst, at hini fakfeløgini hava fingið lítið burturúr at seta formenn í fast starv. Og at tað tí hevði verið betri um peningurin í staðin varð nýttur til skeiðsvirksemi fyri limirnar.

## KJAK UM SKEIÐ

Páll Hansen vísti á, at felagið longu stuðlar limum, sum vilja á skeið. Eisini hevur felagið verið í sambandi við Vinnuháskúlan um at skipa fyri skeiðstilboðum og at tilboð vónandi verða á skránni eftir summarferiuna.

Hann vísti á, at skal Maskinmeistarafelagið kunna virka sum eitt nútímans fakfelag, við teimum krøvum og uppgávum sum fylgja við hesum, so noyðist felagið at hava ein formann í føstum starvi. Tíðin

er farin frá at røkja formansstarvið sum framíhjáarbeiði, har formaðurin má dúva upp á vælvild frá arbeiðsgevara sínum fyri at røkja formansskyldurnar, segði hann.

Limir vístu á, at tað er týdningarmikið, at maskinmeistarar og maskinistar sleppa á skeið. Onkur helt tó, at hetta eisini átti at verið ein uppgáva, sum liggur á arbeiðsgevarunum. Tað mest natúrliga hevði verið, at arbeiðsgevararnir settu sum krav, at arbeiðsfólkið fer á skeið.

## FÍGGJARSTØÐAN Í FOKUS

Kjakið um tey bæði uppskotini, sum atkvøðast skuldi um, snúði seg í stóran mun um fíggjarstøðuna hjá Maskinmeistarafelagnum. Og um felagið hevði ráð til uppskotini, sum kostaðu um 500.000 krónur árliga.

Roknskapurin staðfesti, at felagið er sera sterkt fíggjarliga. Felagið hevði meiri enn eina millión í avlopi í fjør og eitt yvirlit vísti, at hesi seinastu 10 ár hevur felagið havt eitt meðalavlop á meiri enn 300.000 krónur árliga.

Páll Hansen vísti á, at avtalurnar, sum í næstum verða gjørdar um tey fremmandu sjófólkini í føroysku altjóða skipaskránni FAS fara væntandi at geva manningarfeløgunum eykainntøkur. Kortini duldi hann ikki fyri, at árið eisini kann gerast dýrt við nógvum samráðingar-, fundar- og ferðavirksemi.

Millum fundarfólkið var onkur, sum loyvdu sær at ivast í um tað var rætt av aðalfundinum at umskipa formansstarvið til lønt fulltíðarstarv, tá ið óvissa nú valdaði um inntøkurnar í 2011. Felagið skuldi helst ikki komið aftur í ta støðu tað var í í 80-unum, tá felagskassin var skralltómur og hækkingar í limagjaldinum var fast punkt á fundarskránni hjá Maskinmeistarafelagnum.



*Páll vann á Finnleifi Guttesen*




Hetta fekk onnur at halda, at her varð málað alt ov svart. Hildið varð tvørturímóti, at felagið hevur neyvan nakrantíð verið betri fyri enn nú og at løtan tí átti at verið júst tann rætta at sett ein fastløntan formann í starv, so at felagið fær virkað sum eitt framkomið fakfelag.

## GREIÐUR MEIRILUTI FYRI LÓGARBROYTING

Møguleikin at hava ein formann í hálvum starvi varð eisini umrøddur. Her mátti fundarstjórin tó gera vart við, at tað bar ikki til at koma við nýggjum uppskotum á sjálvum aðalfundinum. Sostatt kundu fundarfólkini bert velja og vraka millum tey bæði uppskotini, sum vóru komin inn fyri aðalfundin.

Fyrst varð atkvøtt um uppskotið hjá Finnleifi Guttesen, sum fall við brestin. Bert ein atkvøða var fyri. 35 vóru ímóti og tvær atkvøður vóru blankar.

Síðani var uppskotið hjá nevndini

samtykt við 30 atkvøðum. 7 atkvøður vóru ímóti. Ein var blonk.

Sostatt var greitt, at Maskinmeistarafelagið fer til eina skipan við føstum formanni næsta ár. Og løtu seinni var eisini greitt, at tað verður Páll Hansen sum skal stýra felagnum í 1-ára skiftistíðini til aðalfundur verður aftur næsta ár.



Atkvøðuseðlar verða taldir



Aðalfundurin broytti ikki nevndina

# ÓLAVUR OG REGIN AFTURVALDIR

Nevndarval var eisini á áðalfundinum hjá Maskinmeistarafelagnum. Tveir nevndarlimir, Ólavur Gunnarsson og Regin Olsen, stóðu fyri vali. Teir vórðu báðir afturvaldir.

**Nevndin í Maskinmeistarafelagnum sær nú soleiðis út:**
Páll Hansen, formaður
Regin Olsen, næstformaður
John Højsted,
Ólavur Gunnarsson
Jóan Petur Patursson



Sum tiltakslimir vórðu valdir Jón Johansen, sum 1. tiltakslimur og Poul Henning Jacobsen, sum 2. tiltakslimur.. Jón er nývaldur.




# NÝGGJAR TÍÐIR KREVJA FASTLØNTAN FORMANN

**Um eitt ár fær Maskinmeistarafelagið ein formann, sum fer at arbeiða fulla tíð fyri felagið og sum verður valdur fyri trý ár í senn. Aðalfundurin samtykti søguliga lógarbroyting.**

– Hettar er størsta broyting í 70 ára søgu felagsins.

Tað var niðurstøðan hjá afturvalda formanninum í Maskinmeistarafelagnum, Pálli Hansen, eftir at aðalfundurin felagsins hevði samtykt at broyta lógina fyri Maskinmeistarafelagið, so at felagið fær ein formann í føstum løntum starvi.

## FYRSTU FERÐ Í 2012

Fyrsti formaðurin í løntum fulltíðarstarvi skal veljast á ársaðalfundinum í 2012, og tá verður formanstíðin trý ár. Í dag er formansstarvið í Maskinmeistarafelagnum framíhjáarbeiði og formansskeiðið er tvey ár.

Valskeiðið hjá nevndarlimunum verður óbroytt. Teir verða sum nú valdir fyri tvey ár í senn. Tó verða allir ikki útskiftir í senn, men forskotið.

Tað var nevndin í Maskinmeistarafelagnum, sum skeyt lógarbroytingina upp. Eina broyting, sum hevur til endamáls at flyta Maskinmeistarafelagið fram á vegin, í eini tíð við nýggjum krøvum til fakfeløgini.

## NÝGGJAR AVBJÓÐINGAR

Arbeiðið í felagnum er blivið rættuliga tíðarkrevjandi. Fundarvirksemið er stórt og formaðurin situr í nógvum nevndum. Nevndin ásannar at tað ber illa til, at røkja allar uppgávurnar í felagnum til fulnar, tá ið bæði nevnd og formaður gera arbeiðið framíhjá við vælvild frá sínum arbeiðsgevarum.

Samstundis stendur felagið fyri nýggjum avbjóðingum.

Arbeitt verður í løtuni við at fáa skipað viðurskifti fyri tey útlendsku sjófólkini í føroysku altjóða skipaskránni, FAS. Hetta verður gjørt gjøgnum nýggja sjómannafelagið Faroese Maritime Union, FMU og fer hettar at krevja meira av formanninum í Maskinmeistarafelagnum, sum er nevndarlimur í FMU.

Eisini hevur formaðurin ábyrgdina av limablaðnum Mið&Magn og setir blaðútgávan nýggj krøv.

Sambært nevndini í Maskinmeistarafelagnum hevur skrivstovan hjá felagnum so nógv at gera í dag, at tað ber ikki til at áleggja henni fleiri uppgávur. Tískil er neyðugt, at skipa formansstarvið sum lønt fulltíðarstarv um skal klárar at loysa allar uppgávurnar.

## SUM MASKINMEISTARI Á LANDI

Lógarbroytingin merkir, at formaðurin, sum verður valdur í 2012 verður løntur sambært lønartalvuni fyri maskinmeistarar, sum starvast hjá tí almenna á landi, írokna eftirløn. Og tað verður nevndin, sum avger hvussu lønarstigið skal vera.

Harumframt skal formaðurin hava eina viðbót, sum nevndin ásetur. Á aðalfundinum varð upplýst, at loysnin við viðbót er vald fyri at sleppast kann undan at rinda formanninum yvirtíð og fundarsamsýning, sum hevði verið ein dýrari loysn.

Mánaðarlønin hjá formanninum í Maskimeistarafelagnum fer helst at liggja um einar 40.000 kr. uttan viðbót. Hetta er umleið tað sama, sum formenninir í øðrum feløgum sum Starvsmannafelagnum og Skipara- og Navigatørfelagnum fáa í dag, varð upplýst á aðalfundinum.



# YMSAR MEININGAR
# UM BACHELORÚTBÚGVING

**Í samstarvi við Vinnuháskúlan og Fróðskaparsetrið verður í løtuni arbeitt við at umskipa maskinmeistaraútbúgvingina til eina bachelorútbúgving. Eftir ætlan verður nýggja útbúgvingin klár, tá skúlaárið byrjar í august næsta ár.**

Á aðalfundinum kom fram, at kravið fyri upptøku verður at tú hevur eina miðnámsútbúgving. Tó er ætlanin at bjóða eitt serligt førleikagevandi skeið til teirra, sum ikki hava miðnámsskúla og sum so gevur atgongd til útbúgvingina í staðin.

## FRAMTÍÐARTRYGGJA ÚTBÚGVINGINA

Summir limir vóru ivingarsamir til broytingina. Onkur setti spurnartekn við um teir praktisku fakligu førleikarnir hjá maskinmeistarunum kunnu fara fyri skeyti, tá ið útbúgvingin verður flutt á akademiskt stig. Spurt varð um maskinmeistararnir nú skulu vera studentar.

Hesum vísti formaðurin í Maskinmeistarafelagnum aftur. Talan er um at framtíðartryggja maskinmeistaraútbúgvingina, segði Páll Hansen. Skulu tey ungu framhaldandi hava áhuga fyri at útbúgva seg til maskinmeistarar, so mugu broytingar til. Útbúgvingin má kunna brúkast í størri útbúgvingarhøpi. Men broytingarnar fara hinvegin ikki at merkja, at útbúgvingin ikki kann brúkast í tí prakiska lívinum, m.a. umborð á skipunum.

Páll Hansen vísti á, at talan í veruleikanum ikki verður um kollveltandi broytingar. Maskinmeistaraútbúgvingin lýkur longu í dag í stóran mun krøvini til eina bachelorútbúgving. Og tí verður ikki talan um nakra stóra tillaging.

## MASKINISTAR Í KLAKSVÍK

Samstundis sum Vinnuháskúlin skal hava nýggju bachelorútbúgvingina, er ætlanin, at maskinistútbúgvingin í framtíðini burturav skal fara fram á einum komandi maritum depli í Klaksvík, sum verður skipaður í samstarvi við Tekniska Skúlan.

Á aðalfundinum varð spurt hví maskinistútbúgvingin skal vera í Klaksvík. Til hetta upplýsti Páll Hansen, at trupulleikar hava verið at havt nakra maskinistútbúgving í Havn, tí at áhugin hevur verið so lítil. Hinvegin er framvegis tørvur á maskinistum, og tí er tankin, at útbúgvingin kann skipast av nýggjum í Klaksvík saman við Tekniska Skúla.

Vónin er, at komandi maritimi depilin í Klaksvík fer at megna at klekta ein flokk við maskinistum um árið.

# ÚTLENDSK SJÓFÓLK
# FÁA SKIPAÐI VIÐURSKIFTI

**Manningarfeløgini eru farin undir at gera avtalur við fakfeløgini í heimlondunum hjá teimum útlendsku sjófólkunum í FAS. Føroysku feløgini skulu umboða útlendingarnar**





Fremmandu sjófólkunum, sum sigla við skipum undir føroysku altjóða skipaskránni verða skjótt ikki longur harraleys í fakfelagshøpi. Ætlanin er, at føroysku manningarfeløgini skulu umboða tey útlendsku sjófólkini mótvegis reiðarum, viðkomandi myndugleikum og í millumlanda samstarvi.

Hetta verður gjørt gjøgnum nýggja føroyska sjómannafelagið, FMU, Faroese Maritime Union. Eitt felag, sum manningarfeløgini settu á stovn í fjør við júst hesum endamáli.

## MEKSIKO CITY-AVTALAN

Altjóða flutningsarbeiðarafelagið ITF, sum m.a. Maskinmeistarafelagið er limur í, samtykti í fjør tann sokallaða Meksiko City-politikkin. Hetta er ein avtala, sum leggur upp til, at fakfeløgini í flaggstatinum hjá skipunum skulu gera avtalur um tey fremmandi sjófólkini við feløgini í heimlondunum hjá sjófólkunum.

Á aðalfundinum kom fram, at avtalur longu eru gjørdar fyri fleiri skip og at samráðingar í løtuni eru við felag á Filipsoyggjunum, haðani nógvir av sjómonnunum í FAS-skipanini koma.

## GEVUR INNTØKUR

MFU fær samsýning fyri, at tey umboða fremmandu sjófólkini. Á aðalfundinum varð upplýst, at roknast kann við, at áðrenn langt er umliðið vera eini 100 skip í FAS. Sosatt kunnu avtalurnar, sum verða gjørdar teir næstu mánaðirnar við fakfeløg í eitt nú Filipsoyggjum, Pollandi og Ukraina gerast ein góð inntøkukelda hjá føroysku manningarfeløgunum.

Avtalað er, at limafeløgini í FMU – Fiskimannafelagið, Skipara- og Navigatørfelagið og Maskinmeistarafelagið – skulu býta inntøkurnar frá fakfelagsavtalunum millum sín við 25 prosentum hvør. Tey seinastu 25 prosentini fara til FMU. Avtala er gjørd um, at Maskinmeistarafelagið skal hýsa skrivstovuni hjá FMU.



# NORÐMENN KÆRA FØROYINGAR

**Norsk Sjømannsforbund vil hava føroyska flaggið „blakklista", norska felagið hevur kært Føroysku Skipaskránna til altjóða flutningsarbeiðarafelagið ITF. Føroysku manningar-feløgini hava samband við ITF um málið, roynt verður at forða fyri at hetta skal henda**



Diplomatiska maskinaríið hjá føroysku manningarfeløgunum arbeiðir við fullari ferð, nú norska Sjømandsforbunnet hevur vent sær til ITF við kravið um, at Føroyar verða settar á listan yvir lond undir hentleikaflaggi. Lond, sum ikki megna, at liva upp til minstukrøvini til trygd um borð á skipum og sum sjófólk tískil sambært ITF skulu halda seg langt burtur frá.



## FUNDUR Í LONDON

Málið varð umrøtt á aðalfundinum, har Páll Hansen, formaður upplýsti, at ITF ætlar at kalla partarnar saman til fundar í London í vár í eini roynd at loysa knútin. Hann segði, at ITF harmast støðuna og at felagið vónar at partarnir kunnu finna eina loysn.

Eydnast tað ikki, verður málið tikið upp á fundi í ITF í Rio de Janeiro í Brazil í juni. Páll Hansen segði, at Maskinmeistarafelagið vónar at finna eina loysn áðrenn, so sleppast kann undan at fara heilt til Suðuramerika á kreppufund.

## SKIP Í SKERGARÐINUM

Sambært Pálli Hansen er orsøkin til norsku kæruna eftir øllum at døma, at norðmenn eru misnøgdir við, at skip, sum sigla undir FAS javnan eru síggjast í norskum sjógvi og í norskum havnum. Hetta hava tey loyvi til sambært eini gamlari norðurlendskari avtalu. Men sjónin av FAS-skipunum hevur fingið ilt í norsku sjóvinnuni, sum hevur sína egnu altjóða skipaskrá NIS.

Føroysk feløgini hava saman við umsitingini hjá FAS og Reiðarafelagnum roynt at greitt ITF frá, at eingin grund er at stúra fyri FAS, tí skráin virkar undir skipaðum viðurskiftum.

Listin hjá ITF, sum Føroyar helst ikki mugu enda á eitur FOC, sum er stytting fyri Flags of Conveniece campain. Har standa í løtuni 32 lond.



# LEIVUR CHRISTIANSEN

**Útbúgving:**
Skipsførari, tók prógv á Føroya Sjómansskúla í desember 1988.

**Verandi starv:**
Skipari á Teistanum hjá Strandfaraskipun Landsins.

**Hjúnafelagi:**
Conny Christiansen, skrivstovukvinna.

**Børn:**
Christian 20 ár og Laila 15 ár.

**Besta bók:**
Veit ikki hvør bók er best, dámi at lesa ymiskar føroyskar bøkur, sum t.d Teir tóku land, og aðrar líknandi bøkur, eisini endurminningar, hjá ymiskum, bøkurnar hjá Heðin Brú.

**Fyrstu ferð til skips:**
Við rækjutrolaranum Leiki, í august í 1980.

**Longsti túrur til skips:**
Havi verið nógvar langar túrar – haldi, at ein tann longsti var við Faroe Trader, ið vardi 6 mánar.

**Hvørjum skipum hevur tú verðið við:**
Leiki ca. 2½ ár, Klakki 2 ísfiska-túrar, Reynsatindi (trolaranum) ½ ár, Faroe Trader 1 ár, Saksaberg í summarfrítíðini, tá eg gekk uppá skúla, og 4 mánar tá eg var liðugur.

Í 11 ár við rækjutrolaranum Ocean Castle, tríggjar útmynstringar við donskum farmaskipi í 2001- 2- 3

Í 2002 byrjaði eg hjá Strandfaraskipum Landsins: Smyril (gamla), Dúgvuni, Ternuni, Sam, Súluni og við Teistanum síðani 2004. 2006-7 var eg ½ ár við Norrønu.

**Største avbjóðing hjá einum skipara í dag**:
Tað at vera skipari er ein stór avbjóðing í sær sjálvum. At fylgja væl við í øllum, sum tú hevur ábyrgd av. At alt er trygt við skipi, manning og ferðafólki.

**Frítíðarítriv:**
Geri ymiskt heima, har er nokk at tríva í, bæði inni og serliga uttanfyri.

Mær dámar væl at fara ein túr út á Kirkju, har ið barnaheimi er.

Eisini at fara túrar í ymsa staðni í Føroyum.

**Bilur:**
Toyota Avensis

**Telda:**
ADesk

**Besti sangur:**
Sangir hjá Abba og The Beatels.

Nógvir føroyskir sangir og sálmar sum t.d : „Langt burt frá øðrum londum", „Fagra blóma", „Lívsmynd", „Tú fylgdi mær fyrst", Takk, Guð fyri alt sum hendi", bert fyri at nevna nakrar.

**Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum:**
At mann er væl fyri og hevur eitt arbeiði, og góðar starvsfelagar

At tað gongur væl hjá mínum nærmastu, heima og á arbeiðsplássinum,

**Hvat kann øsa teg:**
Tá lønin kemur so er ikki nógv eftir, tá landskassin er farin við sínum, skatti og avgjøldum.

Tá sáttmálar og avtalur ikki verða hildnar.

Annars eri eg komin til tað, at tað loysir seg næstan ongantíð, at øsa seg, tað gongur bara út yvir ein sjálvan?

# MARITIMU ÚTBÚGVINGARNAR
## eiga at uppstigast til bachelorstøðið

**Sambært greinini „Ov drúgt at lesa til skipsførara og maskinmeistara“ á Norðlýsinum tann 4. mars 2011, halda fleiri løgtingslimir, at tað fer at taka ov langa tíð at útbúgva seg, um Helena Dam á Neystabø fær sín vilja við uppstigan til bachelorstig. Og at tað fer at føra við sær at fleiri fara av landinum at lesa.**

*Tekstur: Eirikur Norðberg*


*Eirikur Norðberg*

Støðan í Danmark er tann, at maskinmeistaraskúlarnir hava miðnámsprógv sum upptøkukrav. Tó hava allir skúlarnir „adgangskursus“ og verkstaðarskúla, tað sæst á www.maskinmester.dk.

Sambært álitinum um bachelorútbúgvingar á Vinnuháskúlanum, er ætlanin at bjóða eitt „adgangskursus“ í hálvt ár til tey, ið ikki hava eina miðnámsútbúgving. At Vinnuháskúlin bjóðar hetta skeið, má vera eitt krav, tá hugsað verður um, at tey flestu, ið nú søkja inn, hava antin eina handverkaraútbúgving ella, á navigatiónslinjuni, siglingstíð. Um Vinnuháskúlin ikki fer at bjóða hetta „adgangskursus“, fer man helst at fáa ein trupulleika at manna flokkarnar.

### VENJA SEG VIÐ TANKAN

Tað er bert ein spurningur um tillaging at venja seg við tankan um, at tað tekur eitt hálvt ár meiri enn nú. Og jú, eg veit hvat eg snakki um, tá eg sigi, at tað er bert ein spurningur um tillaging.

Eg bleiv útlærdur sum maskinsmiðjur á Vágs Skipasmiðju í september 2005. Eg byrjaði á Vinnuháskúlanum í august 2006 til maskinmeistara. Tá konan skuldi til Danmarkar at lesa fór eg við eftir tvey ár á Vinnuháskúlanum.

Tá lestrargongdirnar ikki eru heilt líka, gekk eg tvey ár á Københavns Maskinmesterskole og Elinstallatørskole (KME), og fekk prógv sum Professiónsbachelor í juni 2010. Fyri at eg kundi sleppa inn á KME mátti eg lúka krøvini at sleppa inn. Tá eg hvørki hevði eina miðnámsútbúgving ella „adgangskursus", mátti eg taka støddfrøði, alisfrøði og evnafrøði á Vinnuháskúlanum áðrenn eg fór niður. Soleiðis tók tað mær fýra ár at blíva maskinmeistari, hóast eg stóð allar royndir fyrstu ferð. Og tá nú ein tíð er fráliðin, hugsi eg ikki so nógv um, at tað tók eitt ár meir.

## ROYNDIR Á TVEIMUM SKÚLUM

Tá eg nú havi gingið á báðum skúlunum, loyvi eg mær at samanbera. Lat meg beinanvegin sláa fast, at tað tekniska støðið er minst líka høgt á Vinnuháskúlanum sum á KME. Undirvísararnir eru heldur onki aftanfyri teir í Danmark. Og skuldi eg valt skúla í dag, so hevði eg avgjørt valt Vinnuháskúlan. Tó vil eg siga, at eg merkti ein størri seriøsitet millum tey lesandi á KME.

Á Vinnuháskúlanum leggur man dent á nøkur ávís økir, hvar man á KME leggur meiri dent á onnur økir. Tað sum eg haldi er rættiliga áhugavert er, at tá tað kemur til tað tekniska støðið, so kundi man saktans fingið eitt bachelorprógv á Vinnuháskúlanum sum nú er, um man skal samanlíkna seg við Danmark. Tó veit eg eisini at krøvini fyri at fáa eitt bachelorprógv eru onnur enn tey teknisku.

## STRÆVNARI Á VINNUHÁSKÚLANUM

Nú tók eg ikki tvey tey síðstu semstrini á Vinnuháskúlanum, men mín fatan frá mínum gomlu floksfeløgum var, at tað er strævnari á Vinnuháskúlanum enn á KME. Og tað var eisini mín uppliving. Tað eru fleiri próvtøkur og eisini fleiri undirvísingartímar á Vinnuháskúlanum. Tað at tað eru fleiri undirvísingartímar, kemur sjálvsagt eisini av, at á Vinnuháskúlanum er undirvísing í støddfrøði, alisfrøði og evnafrøði; tann undirvísingin er ikki á KME, tá tað er eitt krav fyri upptøku. Tó haldi eg ikki tað er heilt rætt at strika alla undirvísing í støddfrøði og alisfrøði á maskinmeistaraútbúgvingini. Sum eg skilti á onkrum av undirvísaranum á KME, kundi man gott hugsað sær, at tað bleiv undirvíst í teimum lærugreinunum í sjálvari útbúgvingini.

## ROYNDARSTOVURNAR

Royndarstovurnar á Vinnuháskúlanum eru, í fleiri førum, betri enn á KME. Tí vil eg bara heita á leiðsluna á Vinnuháskúlanum at virka fyri at royndarstovurnar vera brúktar mest møguligt og eisini dagførdar. Um royndarstovurnar eru dagførdar og undirvísararnir eru engageraðir at brúka tær, verða tey lesandi eisini meiri motiveraði at læra. Tað er ikki nøkur loyna, at hølisviðurskiftini Undir Krákugjógv eru sera góð tá tað kemur til umstøðurnar hjá teimum lesandi, bæði royndarstovur og flokshølir.

Hetta eru ikki akkurát tær røttu tíðirnar at tosa um at brúka pening uppá at dagføra. Eg havi sæð á onkrum skúla niðri, at fyritøkur, ið framleiða og eru veitarar av lutum, ið verða brúktir á royndarstovum, hava sponsorerað royndarstovurnar. Tað vil siga at tær hava latið lutir, antin ókeypis ella sera bíliga til royndarstovuna, ímóti at tær hava fingið sítt navn skrivað á einum sjónligum stað – tær hava fingið reklamu afturfyri.

## SKIPAN AV ÚTBÚGVINGINI

Tað er ongin ivi um, at útbúgvingin til maskinmeistara er betri og lættari at leggja til rættis, um Vinnuháskúlin sleppur undan at skulu hugsa um, at fólk skulu hava ávísar kvalifikatiónir (maskinist) aftaná eina stutta tíð. So tá nevnt verður, at uppstiganin til bachelor verður óheppin í tí sambandi, samsvarar tað ikki við veruleikan. Støðan í dag er jú tann, at antin velur tú maskinmeistara uppá trý ár ella maskinist uppá 9 mðr – tvær óheftar útbúgvingar. Og hetta haldi eg tey flestu, sum kenna til økið og skúlan, kunnu vera samd um er tann betra loysnin.

## IKKI ÍMÓTI UPPSTIGAN

Tað sum eg havi upplivað í Danmark er, at møguleikarnir fyri víðari útbúgving (kandidat-/mastergrad) eru ógvuliga avmarkaðir. Tí haldi eg tað vera skeivt at brúka møguleikan fyri víðari útbúgving sum grundgeving fyri uppstigan til bachelorstøðið. Lat meg enn einaferð siga, at eg als ikki eri í móti uppstigan til bachelorstøði, eg eri fyri. Man eigur bara ikki at mála alt so ljósareytt fyri fólki, tá veruleikin er ein annar. Eg vóni ikki at hava givið teimum luft undir veingirnar, ið eru ímóti uppstigan.

## VÍÐARI ÚTBÚGVING

Eg havi tó skilt at heitið á tí ætlaðu bachelorútbúgvingini í Føroyum ikki skal vera Professiónsbachelor. Um hetta kemur at broyta nógv uppá møguleikarnar fyri víðari lestri, veit eg ikki, men tað kann bara gera støðuna betri. So mín áheitan á bólkin, ið skal arbeiða við uppstiganini, vil vera, at gera eitt gott og grundigt kanningararbeiði í sambandi við møguleikarnar fyri víðari útbúgving við tí prógvi ætlanin er at lesandi frá Vinnuháskúlanum skulu fáa. Tað hevði eisini verið gott um tað fekst at vita júst hvørjar útbúgvingar tað er møguleiki fyri at taka sum yvirbygnað. Og um

neyðugt verður at „supplera“ onkrar lærugreinar, fyri at sleppa víðari innan t.d. verkfrøði, so at fáa gjørt onkra smidliga skipan. So latið okkum stremba eftir at gera tað sum er gott enn betri – at maskinmeistaraútbúgvingin skal blíva enn betri.

## IKKI FLYTA ÚTBÚGVINGARNAR

Viðvíkjandi flyting av maritimu útbúgvingunum, haldi eg ikki at útbúgvingar skulu flytast av Vinnuháskúlanum í Tórshavn. Mín grundgeving er, at Tórshavn er meiri sentralt, og eisini at tað snýr seg um nøkur fá ár man lesur, og tá er tað eisini meiri spennandi fyri tey lesandi, um staðið liggur sentralt. Tað hevði eisini verið nógv truplari hjá suðuroyingum at ferðast í vikuskiftunum. Sjálvur komi eg úr Vági, so jú eg veit væl hvat tað er at ynskja sær nakrar almennar stovnar úr miðstaðarøkinum.

Eg havi als onki ímóti Klaksvíkini, tvørturímóti. Eg haldi ikki at nakrir av teimum stovnum, ið liggja í Klaksvík, skulu flytast ella niðurleggjast. Sum eg skilji er Sjómansskúlin í Klaksvík ein vælkoyrandi skúli, so hví ikki bara lata skúlarnar vera sum teir eru í dag? Jú, kanska eru nakrar fáar krónur at spara, men tær munnu helst vera sera, sera fáar; so vónandi fer samanleggingarbylgjan at leggja seg skjótt. Og fyri at lúka krøvini at sleppa inn á Vinnuháskúlan til skipsførara, kundu tey á sjómansskúlanum í Klaksvík bara undirvíst eitt sindur meiri í støddfrøði, alisfrøði og teimum neyðugu lærugreinunum. Innan virkisstýring verður ofta tosað um at ein skal gera tað ein er góður til.

Vandin við einum maritimum depli kann blíva at tann stovnurin skal fevna um so nógv at fokusið kann fara av teimum týdningarmiklu og teknisku lærugreinunum.

## ÚTBÚGVA TEIR BESTU MASKINMEISTARARNAR

At snakka um bæði at bjóða verandi útbúgving út samstundis sum farið verður undir eina bachelorútbúgving, haldi eg er heilt burturvið. Sum sagt er tað bara ein spurningur um tíð til fólk hava vant seg við, at tað tekur trý og eitt hálvt ár at útbúgva seg til maskinmeistara ella skipsførara. Í staðin fyri at vilja hava tvær útbúgvingar, so latið okkum heldur vera framsøkin og royna at savna bestu undirvísararnar á Vinnuháskúlanum soleiðis at vit kunnu útbúgva teir bestu maskinmeistararnar og skipsførararnar. Í staðin fyri at køva hugin hjá ungum við at siga at nú fer tað at taka so og so langa tíð, so latið okkum heldur uppmuntrað tey til at grava seg í bøkurnar og undirvísingina hesi 3,5 árini.

Eg veit væl at tað ikki eru øll, ið søkja inn, ið hava hug til eina langa útbúgving, nøkur hava hug til at blíva antin maskinist ella skipari. Sjálvandi skulu tey eisini hava møguleika fyri tí.

## EFTIRMETING AV SAMANLEGGINGINI

Nú nøkur ár aftaná, hevði verið áhugavert at hoyrt eina fak_liga og sakliga eftirmeting av samanleggingini av Maskinmeistaraskúlanum og Sjómansskúlanum. Eg byrjaði á Vinnuháskúlanum stutt eftir at samanleggningin var framd. Tað keðiligasta við tí samanlegginigini var avgjørt, at maskinmeistaraflokkarnir skuldu flyta úr bygninginum Undir Krákugjógv, ið hevði báði sera góð undirvísnigarhølir og royndarstovur. Hetta gjørdist eisini ópraktiskt tá royndarstovurnar skuldu brúkast.

Eg eri als ikki ímóti hugsanini um Vinnuháskúlan, men tá hølisviðurskiftini ikki vóru optimal til samanleggingina, so er tað ivasamt um tað var rætt. Tað hevði bara verið áhugavert at hoyrt eina eftirmeting nú nøkur ár aftaná.

## IKKI LÆKKA TEKNISKA STØÐIÐ

Vit kunnu heilt víst læra nógv av dønum, men tá tað kemur til maskinmeistaraútbúgving haldi eg vit eru fult á hædd við teir, so latið okkum brúka hesa uppstigan til bachelorstig til at gera føroysku maskinmeistaraútbúgvingina enn betri.

Tað hevur fleiri ferðir verið ført fram, at maskinmeistaraútbúgvingin í Føroyum er góð. Tí taki eg fult og heilt undir við, men latið okkum ikki bara setast uppafturá og vera nøgd við tað, men heldur royna at gera hana enn betri. Tá nýggja bachelorútbúgvingin verður skipað á Vinnuháskúlanum, haldi eg tað vera av stórum týdningi, at man ongantíð lækkar tað tekniska støðið ella ofrar tað fyri nakrar aðrar, og kanska meiri „bleytar“ lærugreinar.

## EIN AV OKKARA STOLTLEIKUM

Eg haldi at maskinmeistaraútbúgvingin hevur liðið nóg nógv undir tí stríði, ið hevur verið. Latið okkum tí hyggja frameftir og hava sum mál, at maskinmeistararnir, ið lesa á Vinnuháskúlanum, skulu vera millum teir, ið eru tekniskt best fyri. Vónandi fara politiskar visiónir og lokalpolitikkur ikki at liggja í vegin fyri at nakrar góðar útbúgvingar kunnu gerast enn betri.

Latið okkum heldur royna at gera Vinnuháskúlan til ein enn betri og sterkari útbúgvingarstovn, sum kann vera ein av okkara stoltleikum. Latið okkum eisini ansa eftir ikki at køva hugin hjá teimum ungu at nema sær hægri útbúgving.

Maskinistur | Maskinmeistari | Skipari | Skipsførari



# Spennandi útbúgvingar
## eitt hav av vinnumøguleikum

### Maskinmeistari
Maskinmeistaraútbúgvingin er mest fjølbroytta og hægsta tekniska yrkisútbúgving, sum kann takast í Føroyum. Útbúgvingin gevur sera stórar møguleikar, bæði á sjógvi og landi, líkamikið um tað er í Føroyum ella úti í heimi. Maskinmeistaraútbúgvingin gevur eisini møguleikar fyri at blíva elinnleggjari. Eisini í oljuvinnuni eru maskinmeistarar størsti einstaki yrkisbólkurin. Útbúgvingin tekur 3 ár.

Upptøka til maskinmeistaraútbúgvingina er tvær ferðir um árið.

### Maskinistur
Maskinistútbúgvingin gevur møguleikar fyri at vera maskinstjóri á flestu veiðuførum, sum fiska í føroyskum sjóøki. Útbúgvingin gevur t.d. eisini rætt til at vera maskinstjóri á skipum við maskinorku upp til 3000 kW í altjóða sigling. Útbúgvingin tekur 9 mánaðir.

Upptøka til maskinistútbúgvingina er eina ferð um árið.

### Skipari
Vinnuháskúlin bjóðar altjóða góðkendar útbúgvingar til skipara og skipsførara, sum geva vinnumøguleikar á sjógvi og landi um allan heim. Sum skipari kanst tú føra øll fiskiskip um allan heim, eins og farmaskip, upp til 3.000 tons.

Skiparaútbúgvingin tekur hálvtannað ár. Tá ið tú hevur staðið skipara, kanst tú fara beinleiðis til skipsførara.

### Skipsførari
Skipsføraraútbúgvingin tekur tilsamans 3 ár; 3 hálvár til skipara og síðani 3 hálvár til skipsførara. Sum skipsførari kanst tú føra øll skip á øllum høvum.

Upptøka til skipara- og skipsføraraútbúgvingarnar er tvær ferðir um árið.

Maskinist- og maskinmeistara-, skipara og skipsføraraútbúgvingarnar eru moduluppbygdar.

Umsóknarfreist er 1. juni 2011.

KREA · TEL 60 80 80

**VINNUHÁSKÚLIN**
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Postboks 104 · FO-110 Tórshavn
Tel 350 250 · Faks 350 251 · info@vh.fo · vh.fo

# MENN – hitt veikara kynið



*Tekstur til myndir: Robot assisterað radikal prostatektomi á Aalborg Sygehus*

Tá heilsustøðan verður eftirhugd, eru mannfólk eftirbátar. Samanborið við kvinnur liva føroyskir menn umleið 5½ ár styttri enn konufólk. Livialdurin hjá monnum er í miðal 76,9 ár, hjá kvinnum 82,4 ár. Hví er so stórur munur?

Í nógvum londum kunnu menn fáa fyribyrgjandi heilsukanningar. Í Bretlandi verður hetta gjørt í sokallaðum wellman clinic.

Her verður hugt at nógvum faktorum, ið kunnu elva til sjúku, ið styttir um lívið hjá mannfólki.

## PROSTATA

Generelt kann sigast, at mannfólk kunnu hava 3 sjúkur í prostatakertlinum.

Bruni í prostatakertli (prostatitis) sæst serliga hjá ungum monnum.

Støddarøktur prostatakertil (benign prostatahyperplasi) sæst serliga hjá eldri monnum. Og síðst prostatakrabbi, ið kann síggjast hjá monnum, sum oftast omanfyri 50 ára aldur.

Í Føroyum doyggja umleið 12-15 menn um árið av prostatakrabba. Tað verða staðfest umleið 40-50 tilburðir av prostatakrabba, og umleið 400-500 menn liva við prostatacancer-diagnosuni.

## PROSTATA KRABBI

Prostatakrabbi kann diagnosticerast á ógvuliga einfaldan hátt við, at ein tekur eina blóðroynd (PSA). PSA skal vera minni enn 3 hjá monnum undir 50 ár, og minni enn 4 hjá monnum, ið eru eldri. Generelt kann tó sigast, at hjá flest øllum monnum liggur virðið nógv lægri. Meginreglan sigur, at um ein maður hevur PSA minni enn 1, tá hann er 60 ára gamal, so fer hann ongantíð at fáa prostatakrabba. Nýliga varð gjørd ein kanning í Svøríki, har 20.000 menn luttóku í PSA-screening.

Niðurstøðan var, at deyðatalið av



prostatakrabba kundi helvtarbýtast hjá monnum, ið fingu gjørt PSA-screening (mált PSA annaðhvørt ár frá tí, at teir vóru 50 ár, til teir vóru 69 ára gamlir).

## ARVUR

Fyri at hetta endamálið kundi røkkast, máttu umleið 400 menn gjøgnum PSA-screening, og fyri at bjarga einum manni undan at doyggja av prostatakrabba, máttu 12 menn viðgerast. Prostatakrabbi er í nógvum førum arviligur, og um prostatakrabbi er hjá faðir ella beiggja, er vandin fyri sjálvur at fáa sjúkuna fimmfaldaður.

## KANNINGAR

Afturat blóðroynd við PSA er eisini neyðugt, at læknin ger kanning upp í endatarmin og følir, hvussu prostata er av konsistensi (um hann er bleytur ella knyklutur). Um illgruni er um prostatakrabba, verður maðurin vístur víðari til nærri kanning hjá urologi. Her verður gjørd skanning av prostatakertli upp gjøgnum endatarmin. Um nakað illgrunasamt er at síggja, verða tiknar royndir av kertlinum (biopsi).

Í hesum kann so síggjast, um prostatakrabbi er til staðar ella ikki. Tá sjúka verður staðfest, verða gjørdar ymiskar skanningar av kroppinum fyri at útihýsa, at sjúkan hevur spjatt seg. Um so er, at maðurin er kandidatur til at fáa lekjandi viðgerð, eru nógvir møguleikar. Gevast kann stráluviðgerð, frystiviðgerð, innvortis stráluviðgerð (brakyterapi), og eisini ultraljóðviðgerð.

## SKURÐVIÐGERÐ ROYNIST BEST

Flestu urologar eru tó samdir um, at tann viðgerð, ið gevur besta møguleika fyri at gerast frískur, er ein skurðviðgerð. Nú á døgum kann ein slík skurðviðgerð gerast robot assisterað. Hesi síðstu 3-4 árini eru læknar í Danmark byrjaðir at brúka robot til hesa skurðviðgerð. Hesin robottur ger, at skurðviðgerðin er meira neyv, og trupulleikarnir aftaná skurðin sostatt minni. Tað er gjørligt í røttu førum at kunna varðveita nervalagið til undirlívið, so maðurin kann varðveita sín potens aftaná skurð.

## TRUPULLEIKAR

Eisini er vandin fyri, at hann fær trupulleikar við at halda vatninum aftaná prostataskurð minni. Sum oftast kunnu menn sleppa heim av sjúkrahúsi longu dagin eftir, at teir hava fingið robot assisteraða skurðviðgerð fyri prostatakrabba. Í Danmark eru 4 sentur, ið gera robotkirurgi (Herlev, Ríkissjúkrahúsið, Skejby og Aalborg).

Mannfólk er ein viðbrekin skapningur. Teir liva 5½ ár styttri enn konufólk, og hava nógvar sjúkur, ið raka. Tað er tó ofta upp til mannin sjálvan at hava ein lívsstíl, ið fyribyrgir sjúkum. Eisini er tað týdningarmikið at søkja heilsukanning, ið kann geva eina ábending um, hvat í loysir seg at gera, fyri at kunna liva eitt longri lív við betri heilsu og betri lívskvaliteti.

## BROT ÚR DAGBÓKINI

**03-01-11. FR:** Sáttmálasamráðingar

Sáttmálasamráðingar við Reiðarafelagið **(FR)** saman við Skipara- og Navigatørfelagnum.

**05-01-11. FR:**
SáttmálasamráðingarviðFR.Seralangur fundur, vit mettu, at vit fingu semju á hesum fundi um flakatrolararnar, línuskip og nótaflotan.

**06-01-11. FR:**
Sáttmálasamráðingarnar halda fram, drúgvur fundur, feløgini vilja ikki ganga við til munandi niðurskurðir, men vit kunnu tosa um reguleringar.

**11-01-11. FR:**
FR hevði kallað til fundar við stuttari freist. FR ásannaði, at ikki bar til at koma víðari við teirra upprunaligu krøvum, Viberg Sørensen staðfesti, at støðan var tann sama hjá yvirmannafeløgunum og FF, so hann vildi boða semingsmanninum frá hesum og hettar varð síðani gjørt.

**12-01-11. FR:**
Stuttur fundur saman við semingsmonnunum, semingsfundirnir skuldu takast upp á Hotel Hafnia tann 14-01-11. Kl. 13.00

**14-01-11. Hotel Hafnia, seming:**
Her bleiv fundast allan fríggjadagin, leygardag. Um kl. 18 sunnukvøldið boðaðu semingsmenninir frá, at teir ikki løgdu nakað semingsuppskot fram, og bóðu partarnar fara hvør til sítt, tað var heilt einfalt for langt millum partarnar.

**18-01-11. FSN:**
Stuttur fundur millum manningarfeløgini, har vit kunnaðu hvønn annan, og tosaðu um tað íkomnu støðuna.

**24-01-11. FF:**
Fundur millum semingsmennirnar, MF, FSN og FF. Semingsmenninir ynsktu bara at kunna seg um støðuna. Teir søgdu seg kunna staðfesta, at støðan er óbroytt, og at teir gera ikki meira fyribils.

**25-01-11. MF:**
Fundur millum FMU og Nolsø Shipping um sáttmálaviðurskifti, eisini bleiv tosað um avtalu við AMOSUP, og sigling í krígsumráði.

**26-01-11. FR:**
Fundur millum semingsmenninar, Føroya Reiðarafelag og manningarfeløgini.

**26-01-11. Fíggjarmálaráðið**:
Fundur í Fíggjarmálaráðnum, evni Strandferðslan undir verkfalli.

**27-01-11. MF:**
Langur fundur millum manningarfeløgini og semingsmennirnar. Feløgini boðaðu frá, at støðan var óbroytt, semingsmenninir boðaðu frá, at teir fóru undir at gera semingsuppskot.

**28-01-11. Hotel Hafnia:**
Um midnáttarleitið løddu semingsmenninir semingsuppskot fyri partarnar, sum fóru hvør til sítt at viðgera uppskotið.

**29-01-11. Hotel Hafnia:**
Um kl. 01.30 boðaðu manningarfeløgini semingsmanninum frá, at tey vrakaðu uppskoti. Føroya Reiðarafelag boðaði frá, at teir góðtóku uppskotið.

**01-02-11. FF:**
Sáttmálasamráðingar við partafelagið Hvalnes. Semja bleiv undirskrivað um Norðborg.

**02-02-11. FF:**
Sáttmálasamráðingar við Felagið Nótaskip, semja bleiv undir skrivað um nótaskipini.

**04-02-11. MF:**
Stuttur nevndarfundur, avgjørt bleiv at gjalda út samsýning til limir nú sáttmálaloysi er.

**04-02-11. FR:**
Semja undirskrivað við Felagið Línuskip.

**05-02-11. FSN:**
Fundur við felagið lemmatrolarar.

**06-02-11. FSN:**
Fundur í hølunum hjá FSN um sáttmálauppskot við Felagið Lemmatrolarar.

**07-02-11. FF:**
Semja bleiv undirskrivað við Felagið Lemmatrolarar.

**08-02 11 FR:**
Fundur við Felagið Trolskip, samráðingarnar slitnaðu, men partarnir funnu fram til semju seint dagin eftir.

**09-02-11. FR:**
Fundir við Felagið Garnaskip, blivu ikki samdir.

**10-02-11. FR:**
Fundir um verksmiðjutrolarar og garnaskip, semja undir skriva um verksmiðutrolarar.

**11-02-11. MF:**
Samráðingarfundur millum Fíggjarmálaráðið, FSN og MF um sáttmála við SSL.

**11-02-11. FR:**
Semja undirskrivað við Felagið Ídnaðarskip og Næraberg.

**12-02-11.FF:**
Semja undirskrivað við Felagið Garnaskip.

**16-02-11. FR:**
Fundur við Felagið Rækjuskip, semja um at skriva undir sáttmála dagin eftir.

**18-02-11. MF:**
Nevndarfundur, eftirmeting av sáttmálasamráðingunum.

**21-02-11. Advokatvirkið:**
Fundur um lógarbroyting o.a.

**23-02-11. Starvsmannafelagið:**
Til móttøku í sambandi við fimti ára dag.

**24-02-11. FSN:**
Fundur við semingsmenninar, eftirmeting av samráðingunum.

**24-02-11. MF:**
Fundur fyri limir í FSN og MF, sum sigla eftir sáttmálanum við Føroya Reiðarafelag fyri Farmaskip.

**25-02-11. FSN:**
Mið og Magn Blaðfundur nr. 31. Komandi útgáva av blaðnum.

**28-02-11. Mentamálaráðið:**
Fundur millum arbeiðsbólkarnar, sum eru settir at fyrireika og seta i verk uppstigan av skipsførara og maskinmeistara útbúgvingunum.

**02-03-11. Fiskimálaráðið:**
Fundur í nevndini um inntøkutrygd hjá fiskimonnum.

**02-03-11. MF:**
Fundur millum MF, FSN og Lønardeildina um sáttmálaviðurskifti hjá SSL. Kom til slit millum partarnar á hesum fundi, og boð vórðu send eftir semingsmonnum.

**02-03-11. MF:**
Nevndarfundur, 6 mál á skráni. Millum annað Aðalfundur, Roknskapur, Sáttmálakrøv og RfF

**08-03-11. FAS. Skrivstovan:**
Fundur millum FAS umsitingina, Reiðarafelagið og manningarfeløgini um at kunna ITF so væl sum gjørligt um okkara viðurskifti og vísa á, at vit hava ein væl skipaðan arbeiðsmarknað, við drúgvum royndum at gera sáttmálar. ITF hevur móttikið eina áheitan frá Norsk Sjømannsforbund um at fáa lista FAS sum hentleikaflagg.

**11-03-11. Norðurlandahúsið**:
Almenn ráðstevna. Leiklutur fakfelagsrørslunar í dag og framyvir.

**14-03-11. Fíggjarmálaráðið:**
Kunning um eftirlønaruppskotið.

**15-03-11. Portugálið**:
Fundur í Sjóvinnuráðnum. Um undanásetning av manningarsjali til „Norden“.

**18-03-11. Starvsmannafelagið:**
Fundur millum MF, FSN og SF um sáttmálan við SSL.

**19-03-11. Hotel Hafnia:**
Aðalfundur og veitsla.

**21-03-11. FSN:**
Mið og Magn Blaðfundur nr. 32. Komandi útgáva av blaðnum.

## FØÐINGARDAGAR HJÁ LIMUM OKKARA

| | | |
|---|---|---|
| Jákup Gunnarstein | 21 juni 1941 | 70 ár |
| Jens Olav Trustrup Jensen | 10 apríl 1951 | 60 ár |
| Niels Jacob Olsen | 15 apríl 1951 | 60 ár |
| Dánial Suni Thomsen | 22 apríl 1951 | 60 ár |
| Gunnar Rubeksen | 22 apríl 1951 | 60 ár |
| Martin Kjærbo | 23 apríl 1951 | 60 ár |
| Jósvein Jacobsen | 27 apríl 1951 | 60 ár |
| Øssur T. Simonsen | 21 mai 1951 | 60 ár |
| Ásmund Lassen | 24 mai 1951 | 60 ár |
| Poul Dávur Poulsen | 26 juni 1951 | 60 ár |
| Narvi Eyðunsson | 26 juni 1951 | 60 ár |
| Almfinn Jacobsen | 7 juli 1951 | 60 ár |
| Sonny Zacharias Zachariasen | 7 juli 1951 | 60 ár |
| Eyðálvur Joensen | 1 apríl 1961 | 50 ár |
| Sigurd Suni Poulsen | 26 apríl 1961 | 50 ár |
| Eyðfinn J. Mellemgaard | 19 juni 1961 | 50 ár |
| Jens Petersen | 14 juni 1971 | 40 ár |
| Árni Østerø | 22 juli 1971 | 40 ár |
| Hans Hilmarson Hansen | 25 juli 1971 | 40 ár |

## BROT ÚR DAGBÓKINI

Umframt teir fundir sum her eru nevndir, so hava vit havt nógvar innanhýsis fundir. Støðan undir verkbanninum var til tíðir sera spent. Felagið hevur havt fundir við skipsmanningar og reiðarar, sum ikki verða nevndir í hesum yvirlitið

**06-01: Gongin**
Samráðingar við Reiðarafelagið.

**07-01: Advokatvirkið**
Fyrireiking av dómsviðgerð í Eik Nordic málinum.

**07-01: MF**
Fundur um sáttmálasamráðingar við Lønardeildina.

**07-10: MF**
Samráðingarfundur við Reiðarafelagið, Semingsmenninir vóru við til fundin.

**11-01: Gongin**
Sáttmálasamráðingar.

**14-01 til 17-01: Hafnia**
Semingsroynd sum endaði uttan at nakað semingsuppskot varð lagt fyri partarnar. Reiðarafelagið lýsti verkbann.

**17-01: Dómhúsið**
Dómsviðgerð í Eik Nordic málinum.

**24-01: Advokatvirkið**
Fyrireiking av Faroe Ship málinum.

**25-01: Fíggjarmálaráðið**
Sáttmálasamráðingar fyri Strandferðsluna.

**26-01: Dómhúsið**
Dómsviðgerð í Faroe Ship málinum.

**26-01: FSN**
Fundur við Formula um dagføringar í okkara telduforritum.

**27-01: MF**
Fundur við Semingsstovnin.

**28-01: Vinnuháskúlin**
Maritimt Forum skipar fyri fundi um broytingar í sjóvinnu útbúgvingunum.

**28-01: Hafnia**
Semingsstovnurin leggur semingsuppskot fram, sum mannningarfeløgini vraka.

**31-01: FSN**
Blaðnevndarfundur.

**01-02: FF**
Semja verður við P/F Hvalnes um broytingar í sersáttmála fyri Norðborg.

**02-02: FF**
Semja verður gjørd við felagi Nótaskip.

**03-03: FF**
Fundur við felagið Línuskip og seinni við Lemmatrolarar.

**04-02: FF**
Samráðingar við felagið Verksmiðjuskip.

**04-02: Nor-Lines**
Móttøka í samband við at Skipafelagið Nor-Lines flytur í nýggj hølir.

**05-02 og 06-02: FSN**
Samráðingar við Lemmatrolarar.

**07-02: FF**
Semja verður gjørd við Lemmatrolarar.

**08-09: Gongin**
Samráðingar við Felagið Trolskip.

**09-02: Gongin**
Semja verður undirskrivað við Felagið Trolskip.

**09-02: Fiskimálaráðið**
Fiskivinnuráði viðgerð uppskot um, broytingar í ungfiskakunngerðini.

**10-02: Portugálið**
Samstarvsráðið hevur fund, nýggjur formaður er Jens Hansen.

**11-02: MF**
Samráðingarfundur við Lønardeildina.

**12-02 og 14-02: FF**
Samráðingar við Garnaskip.

**15-02: Hafnia**
Lívstrygging kunnar um gongdina og, hvussu rentan á pensjónunum verður.

**16-02 og 17-02: Gongin**
Samráðingar við Rækjuskip.

**21-02: Faroe Law**
Fyrireiking av dómsviðgerð í máli mótvegis P/F Hviltenni.

**23-02: Dómhúsið**
Málið móti P/F Hviltenni kemur fyri í rættinum.

**24-02: FSN**
Fundur við semingsmenninar hava vit eftirmeta samráðingar og semings tilgongdina.

**24-02: MF**
Limafundur fyri teir sum, eru í farma- og frálandavinnuni.

**04-03: Fiskimálaráðið**
Fundur í stýrinum fyri Trygdargrunnin.

**04-03: MF**
Samráðingarfundur við Lønardeildina. Avgjørt verður at tilkalla semingsmenn, Jógvan Amonson og Alfred Petersen játta, semingin skal byrja uml 1. apríl.

**07-03: Vinnuháskúlin**
Framløgudagur innan fiskivinnugransking.

**08-03: FAS umsitingin**
Fundur um, at Norsk Sjømandsunion hevur heitt á ITF um at skráseta FAS sum eitt hentleikaflagg.

**11-03: Fiskimálaráðið**
Fundur í Trygdargrunninum.

**11-03: Norðurlandahúsið**
Starvsmannafelagið skipar fyri ráðstevnu um fakfeløg í framtíðini.

**12-03: Dansifrøði**
Starvsmannafelagið heldur 50 ára føðingardag.

**14-03: Fíggjarmálaráðið**
Fakfeløg fáa kunning um pensjónsuppskotið

**16-03: Portugálið**
Sjóvinnuráðið viðgerð kæru um manningarásetan á bunkerskipinum Norden (svenskt skip, sum er ávegis í FAS).

**16-03: FSN**
Fundur við P/F Thor um teirra ætlanir fyri komandi makrelsesongina.

**17-03: FSN**
Nevndarfundur viðgjørt varð millum annað komandi sáttmálasamráðingar fyri farmaskipini.

**19-03: HB húsið**
Maskinmeistara felagið fyllir 70 ár.

**22-03: Norðurlandahúsið**
Havstovan skipar fyri Fiskivinnutingi.

**25-03: Portugálið**
Fundur í Samstarvsráðnum.

# FØÐINGARDAGAR HJÁ LIMUM OKKARA

| | | |
|---|---|---|
| Suni Lamhauge | 20 juli 1941 | 70 ár |
| Svabo Poulsen | 31 juli 1941 | 70 ár |
| Atli á Plógv | 9 apríl 1951 | 60 ár |
| Haldor M. Haraldsen | 10 apríl 1951 | 60 ár |
| Eyðfinn á Reynatrøð | 4 mai 1951 | 60 ár |
| Kári millum Garðarnar | 5 mai 1951 | 60 ár |
| John Hansen | 4 juni 1951 | 60 ár |
| John Andru Hansen | 4 juni 1951 | 60 ár |
| Ellind Danielsen | 12 juni 1951 | 60 ár |
| Erlendur Simonsen | 4 apríl 1961 | 50 ár |
| Arvid Nilssen | 12 mai 1961 | 50 ár |
| Johannes Joensen | 24 juni 1961 | 50 ár |
| Hanus Durhuus | 14 juli 1961 | 50 ár |
| Suni Poulsen | 14 juli 1961 | 50 ár |
| Hans Helgi Strøm | 14 mars 1971 | 40 ár |
| Bogi Kallsberg | 5 apríl 1971 | 40 ár |
| Magnus Jacobsen | 7 apríl 1971 | 40 ár |
| Jógvan Vilhelm | 14 apríl 1971 | 40 ár |
| Óli Hans Fróði Olsen | 23 apríl 1971 | 40 ár |
| Jónsvein Joensen | 1 mai 1971 | 40 ár |
| Súni Hansen | 5 juni 1971 | 40 ár |
| Vilhelm S. Petersen | 27 juni 1971 | 40 ár |
| Símun P. Dam | 27 juni 1971 | 40 ár |
| Jón Rubeksen | 28 juni 1971 | 40 ár |
| Jógvan Gulaksen | 15 juli 1971 | 40 ár |
| Hjalti Eliasen | 28 juli 1971 | 40 ár |

*Eyðstein Djurhuus.:*

# TÝÐANDI SIGRAR VUNNIR



Ein týðandi partur av arbeiðinum hjá einum fakfelag er at fáa staðfest, hvørji rættindi limirnir hava. Hetta verður sum oftast gjørt við, at felagið førir eitt rættarmál vegna limirnar. Tað er sera umráðandi, at fáa viðhald í prinsippiellum spurningum, tí rættarstøðan kann broytast í gjøgnum hesi rættarmál. Soleiðis kann ein sigur hjá einum einstøkum, limi gagna øllum limunum.

FSN hevur ført eitt mál fyri 5 limir sum sigldu við Bliki og Lómi hjá Faroe Ship, sum vórðu seldir av landinum í 2008. FSN kravdi, at hesir áttu fráfaringarsamsýning fyri langa starvstíð sambært § 41 í sjómanslógini. Reiðaríið førdi fram, at tá hesir høvdu fingið 6 mánaðar uppsagnarløn, so áttu teir ikki eisini hetta endurgjaldið. Nú er dómur avsagdur, og hann gevur okkum fult viðhald.

Eitt annað sera drúgt og torført mál er eisini endað nú um dagarnar. Tá reiðaríið Nordic fór á húsagang í 2003 vórðu nógvir av limum okkara uppsagdir. EIK Banki yvirtók sjópantikrøvini, sum FSN hevði sett fram. Síðani kom ósemja í millum partarnar um fleiri spurningar, víðvíkjandi uppgerðini av hýrukrøvunum. Spurningurin um, hvørt uppspardir frídagar kundu trekkjast frá uppsagnartíðin, varð sendur til Fasta Gerðarættin til støðutakan. Har fingu vit viðhald í, at limir okkara skulu hava allar sínar frídagar útgoldnar um teir verða uppsagdir. Nú er endaligur dómur komin, um teir spuningar sum gerðarætturin ikki kundi taka støðu til. Tað er nú staðfest at sjómenn eiga fríðtíðarløn á 12 % av uppsagnarlønini og reglarnir um minimalerstaning eisini galda sjómenn. Hetta seinna merkir, at onnur inntøka kann ikki mótróknast í uppsagnarløn, fyri 3 teir fyrstu mánaðarnar.

Tíverri staðfesti hesin dómur eisini, at EIK ikki hevði skyldu at gjalda hýrukrøvini fyri tveir av limum okkara. Hetta kemst av, at teir ikki høvdu siglt við nøkrum av teimum skipunum, sum vit høvdu framt arrest í. Uttan iva hevur felagið ein part av ábyrgdini fyri hesum mistaki.

Hesi mál taka langa tíð, og sera gott tol skal til. Tað hjálpir tó nakað, at sáttmáli okkara sigur at ikki goldin hýra verður rentað við 1,5 % um mánaðan ella 18 % um árið. Samlaða peningaupphæddin fyri hesi bæði málini er meir enn 2 milliónir.




Nú setir Føroya Tele fulla ferð á internetið til føroysk fiskiskip við at bjóða breiðband heilt út á 60-70 fjórðingar. Tað merkir skjótt og nýmótans samskifti gjøgnum eitt nú teldupost, vanligt internet og sms.

Sambandið millum brúgv og reiðarí verður tí munandi betri, og skipið kann gera sítt egna net, so at øll manningin kann vera online við síni kæru, tá stundir gevast. Tað skapar trivnað og kappingarfyrimunir.

**Tekna hald**
Vilja tit hava SjóNet og fáa alt við umborð, setið tykkum so í samband við tykkara ráðgeva á vinnudeildini á 30 33 70. Vit vegleiða fegin um tykkara møguleikar. Til ber eisini at lesa meira á www.ft.fo/vinna.

**Um SjóNet**
SjóNet er langtrøkkandi internet frá Føroya Tele til skip undir Føroyum. Tað gevur upp til 7 Mbit breiðband og røkkur 60-70 fjórðingar úr landi. Íseting og útgerð er ikki partur av haldinum, men vit ráðgeva um hesar tænastur eisini.




**SjóNet**

| Hald | Ferð | Nýtsla | Mðr.gjald kr. |
|---|---|---|---|
| SjóNet lítið | Upp til 2 Mbit/s | 3 GB | 299 |
| SjóNet vanligt | Upp til 5 Mbit/s | 15 GB | 1.299 |
| SjóNet stórt | Upp til 7 Mbit/s | 60 GB | 3.999 |

Allir prísir eru uttan mvg. Les annars um treytir á www.ft.fo/vinna.

**Okkara samstarv við vinnuna er breitt**

Føroya Tele gongur altíð á odda við vinnuligum kt-tænastum, sum geva tínari fyritøku møguleika at vinna. Hitt tín vinnuráðgeva á 30 33 70.

FØROYA TELE


Betri at hava gott í væntu
Sum limur í Føroya Skipara- og Navigatørfelagi og Maskinmeistarafelagnum hevur tú hevur møguleika frítt at velja, hvar tú ynskir at hava tína pensjónsuppsparing og lívstrygging.
Endamálið er at tryggja eina munagóða samansparing, sum er við til at leggja lunnar undir eina framhaldandi vælferð, tá ið tú fert frá fyri aldur.
Um tú velur at flyta til ella stovna tína pensjón hjá Betri pensjón, kanst tú fáa heilt upp til 15 % í avsláttri av tínum privatu tryggingum hjá Tryggingarfelagnum Føroyum. Við í minsta lagi at rinda kr. 18.000,- árliga til Betri pensjón fært tú harumframt 20 % av privata tryggingargjaldinum útgoldið við kekki hvørt ár í januar mánaði, so tú kanst fáa heilt upp til 32 % í avsláttri.
Vit geva tær persónliga ráðgeving og seta pensjón og tryggingar saman eftir tínum tørvi, so tú kanst spara sum mest saman til eitt betri lív við eftirløn. Meiri fæst at vita á telefon 345 700 ella við at senda ein teldupost til betri@betri.fo
betri.fo
TRYGGINGARFELAGIÐ
FØROYAR
- so ert tú tryggari
Betri pensjón